| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>19. apríl 2016 | Blað nr.: 12953<br>Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** 19. apríl 2016 **Kl**. 18:00
**Stað**: Býráðssalurin
**Málsnr:**

**FUNDARLEIÐARI:**
Heðin Mortensen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Jógvan Arge
Tróndur Sigurðsson
Bogi Andreasen
Halla Samuelsen
Annfinn Brekkstein
Jákup Dam
Marin Katrina Ragnarsdóttir Frýdal
Elin Lindenskov
Bjørghild Djurhuus
Helena Dam á Neystabø
Sjúrður Johan Olsen
Sigrun Amalia Mohr

**LUTTÓKU EISINI:**
Eyðna Justinussen
Ingunn Eiriksdóttir
Jóan Petur Hentze
Mikael Viderø
Sigurð Ó. Vang
Randi Saxov

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Bjørgfríð Ludvig

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 97/16 | 16/00042-1 | Mál beind í nevndir 2016 | 12956 |
| 98/16 | 14/00953-4 | Søla av fleiri kommunalum ognum - sølutilgongd (2013-1488) | 12957 |
| 99/16 | 16/01469-1 | NFG17 – Atkomuhæddin | 12960 |
| 100/16 | 14/02723-81 | Leigusáttmáli við P/F Sundsneystini - matr. nr. 4c á Sundi. | 12961 |
| 101/16 | 15/01982-1 | Glastak á perlutorg | 12966 |
| 102/16 | 15/01465-2 | Bústaðir. Umsókn um at leiga part av Kommunuskúlanum til lestraríbúðir. | 12969 |
| 103/16 | 16/01116-1 | Makaskiftisavtala við Mentamálaráðið um skúlabygningar | 12975 |
| 104/16 | 16/01125-1 | Tórshavnar Musikkskúli: Nýggjar upptøkureglur | 12976 |
| 105/16 | 14/01009-29 | Frítíðarskúlin opin arbeiðsdagar, tá skúlin er stongdur, og frítíðartilboð til børn í 3. flokki | 12977 |
| 106/16 | 14/05223-3 | Umsókn frá Eysturskúlanum um játtan at keypa 27 fót glastrevjabát | 12987 |
| 107/16 | 14/04763-136 | Umsókn um stuðul til umvæling av Tórshavnar ítróttar- og samkomuhøll - skeyti 1386 - ymiskt tilfar í eini kassettu (1999-0345) | 12990 |
| 108/16 | 16/01304-1 | Eykajáttan í sambandi við at at Tórshavnar kommuna verður 150 ár í 2016 | 13008 |
| 109/16 | 14/02777-2 | Sjálvsognarstovnurin "Íbúðir til ung undir útbúgving": Umsókn um heimild at taka lán | 13009 |
| 110/16 | 16/01227-2 | Umsókn frá Articon um víðkan av leiguøki á havnarlagnum á Sundi | 13011 |
| 111/16 | 16/01324-2 | Umsókn um at broyta byggisamtyktina fyri matr. nr. 238a, 238b, 239 og 236, Kollafjørður | 13013 |
| 112/16 | 16/01190-2 | Uppskot til broyting av byggisamtyktini fyri Kollafjørð - partur av D1-økinum við Sjógv verður broytt til C2-øki | 13014 |
| 113/16 | 16/01221-3 | Áheitan á kommununa um at strika servituttin á ognini matr. nr. 1041a, Tórshavn | 13015 |
| 114/16 | 14/01470-1 | Lendisgøtur 2014 | 13016 |
| 115/16 | 15/04159-4 | Umsókn um yvirtøku av vegnum Grønalíð, matr. nr. 1184 og | 13018 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | | 886d, Tórshavn | |
| 116/16 | 15/04352-4 | Undirskriftir frá íbúgvum í Traðabrekku um trupul atkomuviðurskifti, at eystari endin á vegnum verður bundin í Hoyvíksvegin | 13019 |
| 117/16 | 16/00394-3 | Umsókn um yvirtøku av privatum vegi ovara part av Perskonugøtu. | 13022 |
| 118/16 | 14/01352-11 | Arbeiði at dagføra kloakkir í Tórshavnar kommmunu sambært góðkendari spillivatnsætlan til 2015 | 13023 |
| 119/16 | 16/00040-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2016 | 13027 |
| 120/16 | 16/01103-1 | Ársroknskapur fyri 2015 hjá Tórshavnar kommunu | 13028 |
| 121/16 | 16/01133-1 | Ársroknskapur Tórshavnar havn 2015 | 13029 |
| 122/16 | 16/01591-1 | Framflytingar roknskaparárið 2015 | 13030 |
| 123/16 | 16/00721-3 | Grøn ætlan fyri Tórshavnar Kommunu | 13034 |
| 124/16 | 15/04801-1 | Gul ætlan fyri Tórshavnar kommunu (ljósætlan) | 13035 |

***97/16 Mál beind í nevndir 2016***

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 28.01.2016 | 5/16 | 16/00042-1 |
| 2 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 34/16 | 16/00042-1 |
| 3 Býráðsfundur | 17.03.2016 | 69/16 | 16/00042-1 |
| 4 Býráðsfundur | 19.04.2016 | 97/16 | 16/00042-1 |

**Málslýsing:**

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 28. januar 2016:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 17. mars 2016:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 19. apríl 2016:** Tikið til eftirtektar.

# 98/16 Søla av fleiri kommunalum ognum - sølutilgongd (2013-1488)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 28.09.2015 | 196/15 | 14/00953-4 |
| 2 Býráðsfundur | 30.09.2015 | 170/15 | 14/00953-4 |
| 3 Fíggjarnevndin | 13.04.2016 | 122/16 | 14/00953-4 |
| 4 Býráðsfundur | 19.04.2016 | 98/16 | 14/00953-4 |
| 5 Mentamálanevndin | 04.05.2016 | 138/16 | 14/00953-4 |

**Málslýsing:**
Ognirnar, ið kommunan ætlar at selja, hava ymsar bindingar ið gera, at tørvur er á at viðgera sølutilgondina.
Til fundin er gjørt nýtt yvirlit yvir ognirnar við ymiskum upplýsingum, j. nr 2013-1488/1

**Fíggjarnevndin 19. juni 2013:** Málið umrøtt

**Ískoyti**
Fíggjarnevndarlimurin, Tróndur Sigðursson, biður um at fáa málið á skrá.

**Fíggjarnevnd 28. september 2015:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Sjúrður Olsen og Annfinn Brekkstein mæla býráðnum til at lýsa hesar ognir alment til sølu við tilskilan av, at kommunan kann vraka tilboð, ið ikki eru nøktandi: Skraddaragøta 1, Vípuvegur 2, Tórsgøta 16, Niels Winthers gøta 5.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðsfundir 30. september 2015:** Atkvøtt varð um tilmæli frá Tróndur Sigurðsson, um at selja Vípuveg 3, Tórsgøtu 16 og Niels Winthers gøta 5, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu
Heðin Mortensen,  Elin Lindenskov, Rúni Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal

Greiddi ikki atkvøðu
Jógvan Arge

**Býráðsfundir 30. september 2015:** Atkvøtt varð um tilmæli frá Tróndur Sigurðsson, um at selja Vípuveg 3, Tórsgøtu 16 og Niels Winthers gøta 5, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu

Heðin Mortensen,  Elin Lindenskov, Rúni Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal

Greiddi ikki atkvøðu
Jógvan Arge

**Býráðsfundir 30. september 2015:** Atkvøtt varð um tilmæli frá Tróndur Sigurðsson, um at selja Vípuveg 3, Tórsgøtu 16 og Niels Winthers gøta 5, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu
Heðin Mortensen,  Elin Lindenskov, Rúni Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal

Greiddi ikki atkvøðu
Jógvan Arge

**Býráðsfundir 30. september 2015:** Atkvøtt varð um tilmæli frá Tróndur Sigurðsson, um at selja Vípuveg 3, Tórsgøtu 16 og Niels Winthers gøta 5, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu
Heðin Mortensen,  Elin Lindenskov, Rúni Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal

Greiddi ikki atkvøðu
Jógvan Arge

**Býráðsfundir 30. september 2015:** Atkvøtt varð um tilmæli frá Tróndur Sigurðsson, um at selja Vípuveg 3, Tórsgøtu 16 og Niels Winthers gøta 5, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu
Heðin Mortensen,  Elin Lindenskov, Rúni Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal

Greiddi ikki atkvøðu
Jógvan Arge

**Ískoyti 07.04.2016.**

**Málslýsing:**

Býráðið hevur samtykt at lýsa Skynbygningin til sølu.

Ein avbjóðing er, at um kommunan selir ognina, fylgir meir enn helmingurin av torginum millum Skyn bygningin og Guðrun og Guðrun bygningin við í søluni, og hevur býar arkitekturin gjørt vart við, at tað er sera óheppið, at missa rættin til torgið.

Tað letur seg ikki gera, innan fyri galdandi byggisamtykt, at frámatrikulera torgið, vísandi til, at matrikulin verður ov lítil í mun til bygning.

Aðrar avbjóðingar eru, at Bankabygningurin og Skyn bygningurin hava felags ketil/oljufýring + aðrar tekniskar veitingar.

Kommunan ynskir at meira lív og virksemið kemur í miðbýin, og stendur bygningurin sum kunnugt tómur við ongum virksemi.

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini mæla til at lýsa ognina til útleigan og kann talan gerast um eitt ella tvey leigumál. Endalig støða verður tikin til leigumálini tá ið innkomin boð eru.

Sum krav til leigumálini verður sett, at talan skal verða um útvent virksemi.

Málið verður at leggja fyri býráðið.

**Fíggjarnevndin 13. april 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. apríl 2016:** Einmælt samtykt.

- Nú kom Halla Samuelsen

# 99/16 NFG17 – Atkomuhæddin

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 01.04.2016 | 106/16 | 16/01469-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 13.04.2016 | 137/16 | 16/01469-1 |
| 3 Býráðsfundur | 19.04.2016 | 99/16 | 16/01469-1 |

**Málslýsing:**
Sum partur av ætlanini at gera atkomuhæddina í bygninginum hjá kommununi í Niels Finsens gøtu 17 (gamli bankabygningurin) meiri útvenda og opna, er farið undir fyrireikingarnar.

Ætlanin er at gera bygningin til eitt møtistað, ein bussterminal við ymiskum útvendum hentleikum.

Ætlanin inniber smávegis tillagingar, men ynskiligt er at varðveita bygningin í størst møguligan mun.

Tillagingarnar fevna um eitt nú atkomumøguleikar frá Steinatúni, nýggja gólválegging, ljósseting, umlegging av el og neti, tillagingar av vesum til almenningin, starvsfólkauppihald o.s.fr.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at samtykkja at játta kr. 1.800.000 av kt. 6110, og at kostnaðurin verður játtaður av meirinntøkunum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 01. apríl 2016:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Helena D. á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein, samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.
Ein minniluti, Jákup Dam, tekur ikki undir við tilmælinum av tí at ongin nágreinilig ætlan við bygninginum fyriliggur.

**Fíggjarnevndin 13. april 2016:** Samtykt at taka undir við meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðsfundur 19. apríl 2016:** Samtykt við 8 atkvøðum fyri og 3 ímóti.

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Sigrun Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen.

Greiddu ikki atkvøðudu:
Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

- Nú kom Helena Dam á Neystabø

| | | |
|---|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>19. apríl 2016 | Blað nr.: 12961 | |
| | Formansins merki: | |

# 100/16 Leigusáttmáli við P/F Sundsneystini - matr. nr. 4c á Sundi.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 13.04.2016 | 123/16 | 14/02723-81 |
| 2 Býráðsfundur | 19.04.2016 | 100/16 | 14/02723-81 |

**2004-1434/72 SG**

**Fyrspurningur frá felag um møguleikarnar fyri at fremja eina ætlan um at byggja neyst í einum parti av grótbrotinum norðanfyri SEV-verkið á Sundi.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Umsitingin hevur móttikið skriv frá umsøkjara um at fáa lendið norðan fyri Sund (grótbrotið) avlagt til p/f Sundsneystini til neystabygging.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 4. juli 2005:** Nevndin samtykti at biðja umsitingina um eina skipanarætlan fyri økið og lýsing av atkomumøguleikunum og at boða umsøkjaranum frá hesum.

**Ískoyti:**
Kommunustjórin hevur um telefonina havt samband við stovnararnar av p.f. Sundsneystunum og eftirlýst

1) umsókn um at keypa lendið norðan fyri Sund (grótbrotið)
2) skipanarætlan fyri økið
3) lýsing av atkomumøguleikunum.

ad 1) Beinleiðis umsókn er ikki send kommununi, men teir vísa til teldubræv frá 30. Juni 2005.
ad 2) skipanarætlan er ikki latin kommununi, men teir hava eina ávegis skipanarætlan at lata.
ad 3) Sum ad 2.

Kommunan hevur fyri tíð síðani keypt lendið (grótbrotið), matr. nr. 4c, Sunds bygd, fyri kr. 262.250,05, sbrt. skeyti frá 14. juli 2005 við treytum.

Búnaðarstovan upplýsir, at kommunan herumframt hevur rindað eitt sindur meira fyri lendið, síðani tað var keypt fyri tíð síðani.

Herumframt hevur kommunan rindað fyri tinglestur og matrikulering.

Í sambandi við málsviðgerðina verður víst til umfarskriv, dagfest 27. oktober 1961, frá Føroya landsstýri til Tórshavnar kommunu og øll kommunustýrini.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til um fíggjarnevndina at leiga sp/f Sundsneyst, matr nr. 4c, Sunds bygd, stødd 30.853 ferm., í 40 ár við rætti til framleingjan og fyri vanligan prís sum óbyggibúgvið havnaøki treytað av loyvi landsstýrisins og treytað av, at bygt verður innan 2 ár.

**Fíggjarnevndin 13. september 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til, í prinsippinum, at leiga s/pf Sundsneystunum økið, matr.nr. 4c, Sundsbygd, stødd 30.853 ferm., til neystabygging og tilhoyrandi virksemi í 50 ár við rætti til framleingjan.

Leigan verður samsvarandi leigu av 3 traðum, t.v.s. kr. 3.000 pr. ár. Fortreyt fyri møguligum leigumáli er, at tílik bygging og virksemi er heimilað í byggisamtyktini fyri økið og at loyvi fæst frá landsstýrinum.

**Býráðið 21. september 2006:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Høgni Mikkelsen hevur ynskt málið fyri fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2006:** Steðgað verður við avgreiðsluni av málinum, meðan heilsu & umhvørvisdeildin arbeiðir við at kanna møguleikan fyri økjum til tyrving.

**Fíggjarnevndin 20. mars 2007:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Jan Christiansen og Høgni Mikkelsen samtykti at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini 13. september 2006.

Ein minniluti, Marin Katrina Frýdal metir ikki at málið er búgvið at fara fyri býráðið vísandi til, at samtyktin í byggi- og býarskipanarnevndini frá 4. juli 2005, enn ikki er fylgd og mælir til at koyra málið aftur í umsitingina.

**Fíggjarnevndin 26. mars 2007:** Tikið av skrá.

**Býráðið 28. mars 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu, at taka undir við tilmælinum hjá hjá borgarstjóranum um, í prinsippinum at leiga s/pf Sundsneystunum økið, matr. nr. 4c, Sundsbygd, stødd 30.853 fermetrar til neystabygging og tilhoyrandi virksemi.

Fortreyt fyri møguligum leigumáli er, at tílík bygging og virksemi er heimilað í byggisamtyktini fyri økið og at loyvið fæst frá landsstýrinum.

**Ískoyti:**
Innlendismálaráðið hevur í brævi dagfest 24. september 2007 heimilað Tórshavnar kommunu at leiga Sundsneystini Sp/f matr. nr. 4c, Sundsbygd, í 50 ár.

Mett verður ikki, at ætlanirnar hjá felagnum Sundsneystini Sp/f samsvara við byggisamtyktina fyri økið, og arbeitt verður tí við at broyta byggisamtyktina fyri økið, so hon samsvarar við ætlanirnar at byggja neyst o.a. á økinum.

Økið, talan er um, liggur í umráðispartinum B9, ið *verður lagdur til vinnu, ið beinleiðis ella óbeinleiðis eru útflutningsfremjandi og til virksemi, ið hava samband við hesar vinnur. Herumframt verður økið tryggjað til verandi elverk og seinni útbygging av verkinum.*

Ætlanin er at broyta byggisamtyktina fyri økið, so økið kemur at liggja í umráðispartinum E, ið verður lagdur til smábáta-, frítíðar- og ítróttarvirksemi.

Ásetingarnar fyri umráðispart E í 3. grundumráði verða soljóðandi:

*Umráðisparturin verður lagdur til smábáta-, frítíðar- og ítróttarvirksemi, ið hevur við sjógvin at gera, t.e. bátahyl, neystabygging, útipláss til smábátar, kappróðrarfeløg o.t. og virksemi, sum hevur samband við hesi, t.e. tænastuvirksemi, bilstøðlar o.t.*

*Skipan og bygging á økinum skal gerast sambært serstakari byggisamtykt.*

Støða skal tí takast til fyriliggjandi fyribils leigusáttmála millum Tórshavnar kommunu og Sundsneystini Sp/f, ið er treytaður av, at byggisamtyktin seinni verður broytt og góðkend av Innlendismálaráðnum. Endaligur leigusáttmáli verður gjørdur millum partarnar, tá Innlendismálaráðið hevur góðkent broyttu byggysamtyktina.

**Tilmæli:**
Kommustjórin, tekniski stjórin og býararkitekturin mæla byggi- og býarskipanarnevndini til at viðmæla fyribils, treytaða leigusáttmálan millum Tórshavnar kommunu og Sundsneystini Sp/f og leggja hann fyri býráðið til endaliga góðkenning umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. oktober 2007:** Tikið av skrá.

**Býráðið 11. oktober 2007:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Vísandi til ískoytið omanfyri, uppskotið til leigusáttmála j.nr. 2004-1434/62, notat í málinum j.nr. 2004-1434/63 verður fíggjarnevndin biðin um at taka støðu til fyriliggjandi fyribils, treytaða leigusáttmála.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir fíggjarnevndini til at viðmæla treytaða leigusáttmálan millum Tórshavnar kommunu og Sundsneystini Sp/f og leggja hann fyri býráðið til endaliga góðkenning umvegis byggi- og býarskipanarnevndina.

Mælt verður fíggjarnevndini til at treyta góðkenningina av, at umsøkjarin letur inn nýtslu-/byggiætlan og tíðarætlan fyri byggingina til nevndina til endaliga góðkenning.

**Fíggjarnevndin 21. mai 2008:** Samtykt at mæla býráðnum, umvegin byggi- og býarskipanarnevndina, til at taka undir við tilmælinum hjá kommunustjóranum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. mai 2008:** Málið er útsett.

**Ískoyti:**
Vísandi til samtykt í byggi- og býarskipanarnevndini 4. juli 2005 ynskir formaðurin í teknisku nevnd, at nevndin tekur støðu til atkomuviðurskiftini við íbindingina til landsvegin.

Víst verður til kunngerð nr. 57 um kommunala byggimálsviðgerð, har tað sambært grein 1 verður víst á, '...*at kommunustýri ikki kunnu geva byggiloyvi ella nýtsluloyvi, fyrr enn tað er staðfest, at tað, sum søkt verður um, eisini kann gókennast av øðrum myndugleikum, ið sambært aðrari lóggávu hava heimild at set krøv..'.*

**Tilmæli:**
Eftir sum Landsverk skal góðkenna íbindingina av vegaatkomu frá Sundi í landsveg, mæla tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin til, at byggimyndugleikin, í sambandi við viðgerð av hesum máli, ger neyvari ásetingar um nevndu íbinding.

**Tekniska nevnd 12. juni 2008:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Tekniski stjórin leggur fram viðmerkingar til treytaða leigusáttmála á fundinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 16. juni 2008:** Nevndin samtykti at tekniski stjórin, kommunustjórin og løgdeildin gjøgnumganga uppskotið til sáttmálan við viðmerkingum at leggja fyri aftur í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. juni 2008:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Jan Christiansen og Høgni Mikkelsen mælir býráðnum til at góðtaka uppskotið til treytaðan leigusáttmála við broytingum.

Ein minniluti, Marin Katrina Frýdal heldur ikki at málið er klárt til at gera leigusáttmála, vísir til tilmæli til teknisku nevnd 12. juni 2008, og at málið eisini eigur at fara í kaldbaksnevndina.

**Býráðið 19. juni 2008:** Atkvøtt um meirilutatilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 8 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvar Arge, Kári Árting, Inga Dahl, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Greiddu ikki atkvøðu: Hildur Eyðunsdóttir, Marin Kathrina Frýdal og Halla Samuelsen.

**Ískoyti:** Sp/f Sundsneystini og Tórshavnar kommuna gjørdu í september 2008 leigusáttmála um øki, matr. 4c, á Sundi. Ætlanin hjá felagnum var m.a. at byggja umleið 100 neyst við tilhoyrandi útgerð og havnaviðurskifti.

Í juli 2011 var nýggja byggisamtyktin fyri øki góðkend, og er talan um øki "E" ætla til smábáta, frítíðar og ítróttarvirksemi.

Av málinum framgongur eitt ávíst samskifti við felagið, men enn er endalig verkætlan ikki góðkend.

Á fundi við felagið 24. apríl 2015 kunnaði felagið um, at ávísar fyrireikingar eru gjørdar um verkætlanina, men at arbeiðið hevur ligið stilt í longri tíð, og at útlit ikki eru fyri, at gongd kemur á aftur verkætlanina í hesum árinum. Óvist er, nær gongd kann koma á aftur arbeiðið, og er ein av orsøkunum tann, at talan er um dýra verkætlan við dýrari vegagerð, ið krevur stóra fígging, sum felagið ikki hevur í løtuni.

Felagið hevur tó ikki slept ætlanini enn og vónini um, at tað kann bera til at gjøgnumføra verkætlanina, men hetta letur seg helst bert gera, um annað virksemi eisini verður á økinum, sum kann vera við til at fíggja eitt nú íløgurnar í vegagerðina. Felagið hevur tó ongar samstarvsfelagar, ið kunnu vera við til at fíggja kravdu íløgurnar.

Vísandi til
- at felagið ikki er komið í gongd við ætlaðu verkætlan sína enn
- ásetingarnar í leigusáttmálanum um, at verkætlanin skal verða góðkend av kommununi innan 2 ár aftaná undirskriving av leigusáttmálanum
- at eingi útlit eru til, at felagið fer í gongd við verkætlan sína innanfyri rúma tíð
- at kommunan ikki fær disponerað yvir økinum, meðan tað er útleigað

verður mælt fíggjarnevndini til at taka støðu til at enda leigumálið.

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á løgdeildini mæla til at enda leigumálið vísandi til, at gongd ikki er komin á verkætlanina enn, og eingi útlit eru fyri, at felagið er ført fyri at fremja ætlanina í verki.

**Fíggjarnevndin 13. april 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. apríl 2016:** Einmælt samtykt.

## 101/16 Glastak á perlutorg

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 15.06.2015 | 153/15 | 15/01982-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 09.11.2015 | 217/15 | 15/01982-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 11.11.2015 | 272/15 | 15/01982-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 13.01.2016 | 7/16 | 15/01982-1 |
| 5 Mentamálanevndin | 10.02.2016 | 25/16 | 15/01982-1 |
| 6 Mentamálanevndin | 02.03.2016 | 77/16 | 15/01982-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 09.03.2016 | 98/16 | 15/01982-1 |
| 8 Býráðsfundur | 19.04.2016 | 101/16 | 15/01982-1 |
| 9 Býráðsfundur | 17.03.2016 | 73/16 | 15/01982-1 |

**Málslýsing:**
Nú virksemið bæði í Perluni og Reinsarínum sum samlað tónleika- og mentanarstað hevur virkað eina tíð, er hugskot um at fáa skipað uttanduraøkið uppí við at tekja útyvir.

Royndir eru gjørdar við fyribils konstruktiónum og takdúki. Møguleiki er eisini at gera permanenta stálkonstruktión við herdaðum glasi. Gjørt er uppskot tí viðvíkjandi, og sum mett verður kostar um 1 mió kr.

Uppskotið verður lagt fram. Byggi- og býarskipanarnevndin skal góðkenna staðseting.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til,
- at gjørd verður visualisering av uppskotinum,
- at heita á teknisku fyrisiting um at viðgera aðrar møguleikar fyri loysnum, sum eisini kunnu liva upp til ynsktu endamálini, og
- at leggja hetta aftur fyri mentamálanevndina til støðutakan.

**Mentamálanevndin 15. juni 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Málið hevur verið til viðgerðar hjá Teknisku fyrisitingini og býararkitektinum. Mett verður, at teltloysnin ikki hóskar so væl til nýtsluna av torginum ella til tiltøkini, sum verða skipað á torginum, og mælt verður til loysnina við glastaki. Býararkitekturin metir harumframt, at um býurin skal kunna gera gagn av torginum og veggjunum rundanum tað, er tað av stórum týdningi, at tað eitt nú er møguligt at sýna filmar og grafikk upp á veggirnar. Hetta er so at siga ómøguligt við teltloysnini. Somuleiðis kann man siga, at estetiskt hóskar glastakið væl til verandi Perlu og kann á henda hátt skapa meira harmoni, enn teltið hevði gjørt. Tó hevur glastakið ein vansa, at torgið altíð verður undir taki, og metir Býararkitekturin, at tað hevði verið til gagns fyri torgið, um takið varð gjørt soleiðis, at glasflaturnar kundu flytast/vippast, soleiðis at sólin ein sólskinsdag sleppur niður á torgið. Eisini verður mælt til, at áleggingin

(belegningurin) eigur at verða gjørd, sum víst í viðhefta tilfari, umframt at møblar/innbúgv og ljósseting eiga at verða hugsað inn frá byrjan av verkætlanini.

Hugsanin er at seta upp stálkonstruktión, sum verður takt við herdaðum glasi. Hjálagt eru tekningar, sum lýsa ætlanina.

Upplýsast skal, at verkætlanin hevur ikki verið viðgjørt í byggi- og býarskipanarnevndini, at umrøða staðseting.

Fyribils kostnaðarmeting er gjørd áljóðandi:

| | |
|---|---|
| Jørð – grevstur og stoyping av fundamenti: | 80.000 kr |
| Stál 4 stk stálkonstruktiónir: | 160.000 kr |
| Stálsperrur 15 stk: | 75.000 kr |
| Festir 4 stk/m2 x 140 $m^2$ | 120.000 kr |
| Glas (herdað/laminerað) 135 $m^2$ x 3500 kr: | 472.500 kr |
| Óvæntað 5%: | 46.000 kr |
| Tilsamans : | 973.000 kr |

Kostnaðarmetingin er uttan kommununnar mvg á 6.25%

Hjáløgd eru 3 fylgiskjøl:
a). Plansjur við dømum um teltloysn og glastaksloysn
b og c). Tekningar yvir glastaksloysnina.

Víst er á møguleikan at fíggja hetta frá íløgujáttan, sum ætlað er til baðiland, men sum enn ikki er fyrireikað.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 1 mió. av íløgukontu 5775 Baðiland til verkætlanina og heimila umsitingini at gera sáttmálar innan fyri hesa játtan til at fremja verkætlanina.

**Mentamálanevndin 09. november 2015:** Nevndin tekur ikki undir við teimum uppskotum, til tak á torgið framman fyri Reinsarínum, sum fyriliggja í málinum.

**Fíggjarnevndin 11. november 2015:** Samtykt at beina málið aftur í mentamálanevndina til nýggja viðgerð.

**Ískoyti:**
Býararkitekturin hevur á fundi í januar við borgarstjóran og forkvinnuna í Mentamálanevndini víst á hvørjir býarskipanarligir møguleikar eru við einum torgið, sum er undir taki.

1. Sum partur av Mentunargøtuni vil torgið gerast meiri brúkiligt undir taki, og har kunnu skipast alskyns mentunarlig tiltøk. Nevnast kunnu listaframsýningar, filmframsýningar o.s.fr.
2. Harumframt kann torgið fevna um fyribils býarskipanarligar uppsetingar, sum býararkitekturin miðvíst arbeiðir fyri at skapa í miðbýnum, soleiðis at borgarin hevur tiltøk/uppsetingar at vitja í miðbýnum. Víst verður til viðløgdu myndir.
3. Til seinast skal nevnast, at økið víðkar um verandi virksemi í Perluni og Reinsarínum. Møguligt verður í størri mun at uppihalda sær á torginum, tá tiltøk eru í ávikavist Perluni og Reinsarínum.

Býararkitekturin kemur á fundin at leggja fram.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka støðu til uppskotið hjá býararkitektinum.

**Mentamálanevndin 13. januar 2016**: Nevndin mælir fyrisitingini til at arbeiða víðari við glastaksloysnini frammanfyri Reinsarínum og Perluni og venda aftur til nevndina við tíðar- og kostnaðarætlan.

**Ískoyti**
Tekstur kemur til fundin.

**Mentamálanevndin 10. februar 2016:** Útsett.

**Ískoyti:**
Tekniska fyrisitingin hevur saman við ráðgevanum P/F Nomatek greinað glastaksloysn og gjørt kostnaðarætlan, ið samstundis er eitt heildarveitingartilboð frá P/F Nomatek, ið takast kann av. Sí hjáløgd skjøl. Mett verður at arbeiðið kann verða framt innan umleið 4 mánaðir.

**Tilmæli**:
Trivnaðastjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at heimilað umsitingini til antin at taka av tilboðnum frá P/F Nomatek ella at heimila umsitingini at innganga avtalur um ráðgeving og fakentreprisur til at fremja verkætlanina innan ásetta karmin.

**Mentamálanevndin 02. marts 2016:** Samtykt at taka av tilboðnum frá P/F Nomatek og beina málið í fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**
Viðvíkjandi fígging til arbeiðið verður víst til tilmæli til fundin í mentamálanevndini 9. november 2015, sum er at játta kr. 1 mió. av íløgukarminum 5775 Baðiland.

**Fíggjarnevndin 09. marts 2016:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Sjúrður Olsen og Annfinn Brekkstein, tekur undir við mentamálanevndini og beinir málið í býráðið at viðgera tvær ferðir.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur støðu á einum seinni fundi.

**Býráðsfundur 17. mars 2016:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 19. apríl 2016:** Einmælt samtykt.

- Nú kom Elin Lindenskov

# 102/16 Bústaðir. Umsókn um at leiga part av Kommunuskúlanum til lestraríbúðir.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 21.05.2015 | 141/15 | 15/01465-2 |
| 2 Býráðsfundur | 21.05.2015 | 87/15 | 15/01465-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 10.06.2015 | 162/15 | 15/01465-2 |
| 4 Býráðsfundur | 22.06.2015 | 124/15 | 15/01465-2 |
| 5 Fíggjarnevndin | 28.09.2015 | 191/15 | 15/01465-2 |
| 6 Býráðsfundur | 30.09.2015 | 155/15 | 15/01465-2 |
| 7 Fíggjarnevndin | 21.10.2015 | 264/15 | 15/01465-2 |
| 8 Fíggjarnevndin | 20.01.2016 | 24/16 | 15/01465-2 |
| 9 Fíggjarnevndin | 28.01.2016 | 41/16 | 15/01465-2 |
| 10 Býráðsfundur | 28.01.2016 | 13/16 | 15/01465-2 |
| 11 Fíggjarnevndin | 19.04.2016 | 153/16 | 15/01465-2 |
| 12 Býráðsfundur | 19.04.2016 | 102/16 | 15/01465-2 |

**Málslýsing**:
**Umsókn um langtíðarleigumál:**
Bústaðir, Føroya Bústaðarfelag, søkir kommununa um at kunna leiga part av Kommunuskúlanum til lestraríbúðir.

Talan er um ein part av lonini, sum vendir móti Sjúrðargøtu/Tróndargøtu, umleið 1.440m² til samans, har ætlanin er at byggja lestraríbúðir.

Bústaðir ynskir at kunna leiga henda partin av bygninginum sum hann stendur, og ber Bústaðir allan kostnaðin av umbygging til íbúðirnar, bæði innan og uttanveggja, t.v.s. at Bústaðir ber allar útreiðslur til verkætlanina.

Bústaðir ynskir leigumál yvir 30 ár, har bústaðir átekur sær at umbyggja og viðlíkahalda lonina í sama tíðarskeiði.

Talan er um eina stóra verkætlan og metir Bústaðir tað vera rættast at lyfta umbyggingina í stigum. Bústaðir er til reiðar at luttaka í tí heildarætlan sum umfatar aðrar partar av skúlanum bæði tí ynskiligt er at fleiri leigubústaðir skulu gerast og tí, at umbyggingar og umvælingar fyri allan skúlan væntandi skulu gerast í einum, t.d. at skifta tak og at skipa uttanum økini.

Bústaðir vísir til fund við stjórn, har avtalað varð at seta ein arbeiðsbólk ið skal lýsa verkætlanina nærri, og skal arbeiðsbólkurin gera eitt tilmæli til stýrið hjá Bústøðum og til politisku skipanina.

Taks setir treytir um talan skal gerast um mvg-frítøku.
Síðani Bústaðir sendi kommununi umsóknina um leigumálið, hevur TAKS víst á, at um Bústaðir skal hava mvg. frítøku fyri umvæling av kommunuskúlanum, er neyðugt

at Bústaðir eigur bygningin, tí TAKS krevur tinglýst veð í bygninginum fyri mvg. frítøkuna.

Bústaðir kannar um til ber at sleppa undan hesi reglu, men um undantak ikki fæst, søkir Bústaðir at keypa partin av Kommunuskúlanum fyri 1. kr. og fær kommunan tá forkeypsrætt, til ein frammanundan mettan prís.

Í løtuni ber tí ikki til at siga, um talan kann gerast um langtíðarleigumál ella um møguliga sølu við kommunalum forkeypsrætti.

Langtíðarleiga/Søla uttan alment útboð.
Sambært svarskrivi sum kommunan fekk frá Innlendismálaráðnum 11. apríl 2013, í samband við at kommunan søkti um loyvi til sølu av lendi til Bústaðir framgongur, at Bústaðir skal javnsetast við almennan mynduleika, og at til ber at selja ognir til Bústaðir uttan at ognirnar verða boðnar alment út.

Onnur formlig viðurskifti:
Møguligt søla/leiga av parti av kommunuskúlanum krevur at hesin parturin verður frámatrikuleraður, og kann tí gerast talan um at kommunan selir umsókta partin av skúlanum, og langtíðar leigar undirlendið.

Sambært samrøðu við Umhvørvisstovuna framgongur, at til ber at frámatrikulerað part av skúlanum til nýtt matrikul nr. treytað av brunagóðkenning. ( Krøv um brandmúr v.m )

**Tilmæli:**
Málið verður lagt fyri fíggjarnevnd til umrøðu og møguliga støðutakan.

**Fíggjarnevnd 21. maj 2015:** Málið umrøtt.

**Býráðið fyri læstum hurðum 21. mai 2015:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Endalig avklároing uppá mvg. spurningin fyriliggur ikki enn, men væntar Bústaðir at ein loysn finst fyri hesum og arbeiðir Bústaðir við upprunaligu loysnini sum umfatar leigu.

Eitt langtíðarleigumál viðførir, at neyðugt verður at frámatrikulera partin, sum Bústaðir leigar til nýtt matrikul nr.

Um kommunan leigar partar av skúlanum út til Bústaðir, verður neyðugt at tryggja, at Bústaðir rindar allar útreiðslur, sum leigumálið hevur við sær, herundir eisini tær útreiðslur,

sum standast av teimum møguligu broytingum av bygninginum, sum verða kravdar í sambandi við frámatrikuleringina. Her verður hugsað um brunamúrar v.m.

Eitt møguligt leigumál skal verða uttan útreiðslur fyri kommununa.

Løgdeildin hevur gjørt eitt uppskot til leigumál, sí skjal nr. 15/01465 – 5

Talan er um 30 ára leigumál við møguleika fyri framlongjan í 10 ár. Tá ið leigumálið gongur út, hevur kommunan rætt til at yvirtaka innrættaðu hølini fyri 75 % av mettum virði. Leigugjaldið er ásett til kr. 1.000 árliga.

**Tilmæli.**
Kommunustjórin og leiðarin á løgdeildini mæla til at leiga Bústaðir uml. 1.440m² av kommunuskúlanum sambært uppskot leigusáttmála, sí skjal nr. 15/01465 – 5.

**Fíggjarnevnd 10. juni 2015:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Sjúrður Olsen og Annfinn Brekkstein taka undir við at leiga Bústaðir uml. 1.440 m² i einum 30 ára leigusáttmála, sum verður at leggja fyri aftur fíggjarnevndina. Málið verður beint í býráðið.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur støðu á einum seinni fundi.

**Býráðsfundir 22. juni 2015:** Fyrst varð atkvøtt um tilmæli frá Tjóðveldi, um at taka Kommunuskúlan niður og at tingast við Bústaðir um at byggja nýggjar lestraríbúðir á staðnum, ið fall við 3 atkvøðum fyri og 8 ímóti.

Fyri atkvøddu: Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen

Greiddi ikki atkvøðu: Elin Lindenskov

Síðan varð atkvøtt um tilmæli frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Elin Lindenskov, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen

Greiddi ikki atkvøðu: Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

**Ískoyti.**
Greitt verður frá málinum. Tilfar kemur til fundin.

**Fíggjarnevnd 28. september 2015:** Kunnað varð um málið, sum verður beint í býráðið.

**Býráðsfundir 30. september 2015:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Frágreiðing og møguligt tilmæli kemur til fundin.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2015:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Tilfar kemur til fundin.

**Fíggjarnevndin 20. januar 2016:** Málið umrøtt og verður lagt fyri aftur á komandi fundi.

**Ískoyti:** Tórshavnar kommuna og Bústaðir eru komin ásamt um treytirnar í einari rammuavtalu fyri verkætlanina at gera Kommunuskúlan til lestrarbústaðir, ið verður løgd fyri fíggjarnevndina og býráðið at góðkenna.

**Tilmæli:** Kommunustjórin og miðfyrisitingarstjórin mæla býráðnum til umvegis fíggjarnevndina at góðkenna fyriliggjandi uppskot til rammuavtalu, j.nr. 15/01465-16 og 15/01465-17.

**Fíggjarnevndin 28. januar 2016:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Sjúrður Olsen og Annfinn Brekkstein, taka undir við tilmælinum og játta kr. 400.000 kr av konto 1313 visandi til § 8 í rammuavtaluni og mæla býráðnum til at góðkenna rammuavtaluna.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur støðu á býráðsfundi.

**Býráðsfundur 28. januar 2016:** Samtykt við 9 atkvøðum fyri og 2 ímóti.

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrun Mohr, Tróndur Sigurdsson, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen og Jan Christiansen.

Ímóti atkvøddu
Jógvan Arge og Marin Katrina Frýdal

Greiddi ikki atkvøðu:
Jákup Dam

**Ískoyti:**
Kunning um verkætlanina
Vísandi til áður samtykta rammuavtalu millum Tórshavnar kommunu og Bústaðir, varð verkætlanin at høvuðsumvæla verandi Tórshavnar Kommunuskúla til lestraríbúðir v.m. bjóðað út millum tveir høvuðsarbeiðstakarar. Tilboð komu inn 16. mars 2016. Tilboðini uppá handverkaraútreiðslur uttan mvg vórðu:
Eysturlon Sp/f 54.849.240,00 kr.
Húsavarðatænastan Sp/f 45.735.753,00 kr.
Ikki bara prísurin hevði týdning, men dømast skuldi eftir fleiri kriterium. Ein verkætlanarbólkur av fólki frá TK, Bústaðir og ráðgevum gjørdi eina innanhýsis meting/døming av innkomna tilfarinum, har komið varð fram til, at Húsavarðatænastan (HVT) hevði eitt betri samlað tilboð. Hesi boðini vórðu givin arbeiðstakarum 22.03.2016. Eftir samtykki frá stýrisbólkinum fyri verkætlanina, varð farið undir samráðingar við HVT.

Samráðingarnar eru komnar á mál, og samlaði verkætlanarkostnaðurin sær nú soleiðis út :

| | | |
|---|---|---|
| Fyrireiking | Kr. | 634.854,00 |
| Arbeiðstakaraútreiðslur | Kr. | 43.516.475,40 |

| | | |
|---|---|---|
| Keyp av konstruktiónsverkfr., ókendar útreiðslur og incitament | Kr. | 4.399.336,50 |
| Ráðgeving El | Kr. | 100.000,00 |
| Byggiharraútreiðslur, trygging, íbinding vm. | Kr. | 1.200.000,00 |
| Projektering, projektuppf. og fakeftirlit | Kr. | 2.982.000,00 |
| Verkætlanarleiðsla | Kr. | 340.625,00 |
| Útreiðslur í smb. við arbeiðstakaratillutan | Kr. | 100.000,00 |
| | | |
| Í alt uttan MVG | Kr. | 52.979.290,90 |

Viðlagt er sáttmáli til partalag, organisatiónsdiagram, ráðgevaraavtala og arbeiðstakarasáttmáli saman við tíðarætlan.

Parturin av handverkaraútreiðslum hjá Tórshavnar kommunu verður at rinda klimaskermin, tó uttan altanir. Restin rindar Bústaðir.

Parturin hjá Tórshavnar Kommunu við øllum er:

| | | |
|---|---|---|
| Handverkaraútreiðslur og byggiplássútreiðslur | Kr. | 12.841.212,00 |
| Ókent og Incitament (33%) | Kr. | 1.354.761,00 |
| Ráðgeving (33%) | Kr. | 984.060,00 |
| Verkætlanarleiðsla | Kr. | 340.625,00 |
| | | |
| Tilsamans | Kr. | 15.520.658,00 |
| Mvg kostnaður tils., verkætlanarleiðsla ikki íroknað | Kr. | 608.127,00 |
| TK, tilsamans við Mvg | Kr. | 16.128.785,00 |

Útyvir hetta, verður í løtuni serskilt arbeitt við at gera drening av kjallaraveggum og sokkli um bygningin og íbinding til kloakk, umframt nýggja parkeringsloysn oman við Tróndargøtu. Umsitingin vendur aftur, tá hesin kostnaður er kendur. Arbeiðið hevur alla tíð verið uttanfyri verandi verkætlan. Hetta arbeiðið skal samskipast við gerð av garðprosjekt seinni.

Sambært rammuavtalu skal TK skeyta Bústaði ognina matr. 339 Tórshavn, burtursæð frá vonginum móti Tróndargøtu, sum er fimleikahøll og rúm tilknýtt fimleikahøll.
Viðlagt er uppskot til skeyti.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, trivnaðarstjórin og kommunustjórin mæla til at játta kr. 16.129.000,00 til verkætlanina at høvuðsumvæla Tórshavnar kommunuskúla og at taka undir við uppskotinum til skeyti.
Partur av fígging er framflytingar av roknskaparári 2015 kr. 12.155.000,00.

**Fíggjarnevndin 19. april 2016:** Fundurin niðurlagdur.

**Tilmæli**
Tekniski stjórin, trivnaðarstjórin og kommunustjórin mæla til at játta kr. 16.129.000,00 til verkætlanina at høvuðsumvæla Tórshavnar kommunuskúla og at taka undir við uppskotinum til skeyti.

Partur av fígging er framflytingar av roknskaparári 2015 kr. 12.155.000,00.

Í restandi 3.974.000 mió. kr. verður fíggja soleiðis:

| | | |
|---|---|---|
| 8175 | Framfluttur løgukarmur, Glyvursvegur við Brúgv | 415.000 |
| 5775 | Framfluttur løgukarmur, Golfvøllur | 400.000 |
| 5775 | L54016, Golfvøllur | 680.000 |
| 7175 | Framfluttur løgukarmur, Tyrvingarpláss | 2.479.000 |

Hædd verður tikið fyri játtanini til tyrvingarpláss í fíggjarætlanini fyri 2017.

**Fíggjarnevndin 19. april 2016:** Fundurin uppafturtikin.

Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Sjúrður Olsen, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

Jógvan Arge tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðsfundur 19. apríl 2016:** Samtykt við 10 atkvøðum fyri og 3 ímóti.

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Sigrun Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen

Ímóti atkvøddu:
Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

Viðm. frá Tjóðveldi: Vegna mátan at fíggja kommunala partin av meirinntøkunum.

# 103/16 Makaskiftisavtala við Mentamálaráðið um skúlabygningar

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 06.04.2016 | 104/16 | 16/01116-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 13.04.2016 | 127/16 | 16/01116-1 |
| 3 Býráðsfundur | 19.04.2016 | 103/16 | 16/01116-1 |

**Málslýsing:**
Innan fá ár er ætlanin, at Skúlin á Fløtum flytur inn í nýggjan skúlabygning á Fløtum. Skúlin húsast í dag í 6 eindum í býnum (t.e. Eindirnar á Argjavegi, í Kongagøtu, í Fríðrik Petersens gøtu, í Gundadali, á Landavegnum og á Frælsinum). Eindin á Frælsinum/Handan Á, er samogn við landið í lutfallinum 40% Tórshavnar kommuna og 60% Mentamálaráðið, og hýsir landið í sínum parti partar av virkseminum hjá Fróðskaparsetrinum.

Tórshavnar kommuna og Fróðskaparsetrið skrivaðu í november 2015 undir samstarvsavtalu – sí her: http://www.torshavn.fo/Default.aspx?pageid=37&NewsItemID=5962

Ein partur av samstarvinum er at stuðla undir at menna universitetskampus í økinum á Frælsinum og Debesartrøð.

Sum liður í hesi visjón og ætlan og við atliti til at rigga av teir skúlabygningar, ið ikki verður tørvur á, tá Skúlin á Fløtum er bygdur út á Fløtum, hevur umsitingin verið í samráðingum við Mentamálaráðið og Fróðskaparsetrið um eina makaskiftisavtalu og eru komin til eina semju. Sí hjálagt uppskot, har nærri greiningar eru av staklutunum í makaskiftinum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja hjáløgdu makaskiftisavtalu og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 06. april 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Helena Dam á Neystabø var ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Fíggjarnevndin 13. april 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. apríl 2016:** Einmælt samtykt.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>19. apríl 2016 | Blað nr.: 12976<br><br>Formansins merki: |

# 104/16 Tórshavnar Musikkskúli: Nýggjar upptøkureglur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 02.03.2016 | 71/16 | 16/01125-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 06.04.2016 | 105/16 | 16/01125-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 13.04.2016 | 128/16 | 16/01125-1 |
| 4 Býráðsfundur | 19.04.2016 | 104/16 | 16/01125-1 |

**Málslýsing:**
Tórshavnar Musikkskúli (TM) og Mentamáladeildin/Trivnaðarfyrisitingin arbeiða við at endurskoðað ymisk viðurskifti hjá skúlanum. Sí eisini mál 15/01950 Mál og avrikssáttmáli 2016 fyri Tórshavnar Musikkskúla.

Gjørt er uppskot til nýggjar upptøkureglur vm. fyri TM – sí hjálagt. Uppskotið er gjørt og viðgjørt í einari breiðari tilgongd á skúlanum, í Musikkskúlanevndini og við umsitingina í kommununi. Ætlanin er, at nýggju reglurnar koma í gildi 1. apríl 2016, og at samstundis verður gjørd ein kunningarætlan, ið skal tryggja at verandi næmingar, og tey á bíðilista fáa góðan møguleika fyri at gera seg kunnugan við broyttu reglurnar, og hvussu mannagongdirnar eru.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja hjálagda uppskot til upptøkureglur vm. fyri Tórshavnar Musikkskúla.

**Mentamálanevndin 02. marts 2016:** Útsett.

**Mentamálanevndin 06. april 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum við teirri broyting at tilmeldingargjaldið verður kr. 2.000,00 íroknað møguligt ljóðføri v.m. Heitt verður á fyrisitingina at konsekvensbroyta uppskotið til reglur og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. april 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. apríl 2016:** Einmælt samtykt.

# 105/16 Frítíðarskúlin opin arbeiðsdagar, tá skúlin er stongdur, og frítíðartilboð til børn í 3. flokki

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 12.02.2014 | 4/14 | 14/01009-29 |
| 2 Mentamálanevndin | 10.04.2014 | 59/14 | 14/01009-29 |
| 3 Mentamálanevndin | 07.05.2014 | 80/14 | 14/01009-29 |
| 4 Mentamálanevndin | 15.05.2014 | 124/14 | 14/01009-29 |
| 5 Fíggjarnevndin | 19.05.2014 | 148/14 | 14/01009-29 |
| 6 Fíggjarnevndin | 06.06.2014 | 160/14 | 14/01009-29 |
| 7 Býráðsfundur | 16.06.2014 | 129/14 | 14/01009-29 |
| 8 Mentamálanevndin | 24.06.2014 | 157/14 | 14/01009-29 |
| 9 Mentamálanevndin | 03.07.2014 | 161/14 | 14/01009-29 |
| 10 Fíggjarnevndin | 03.07.2014 | 210/14 | 14/01009-29 |
| 11 Býráðsfundur | 03.07.2014 | 160/14 | 14/01009-29 |
| 12 Mentamálanevndin | 03.09.2014 | 164/14 | 14/01009-29 |
| 13 Mentamálanevndin | 15.06.2015 | 158/15 | 14/01009-29 |
| 14 Mentamálanevndin | 06.04.2016 | 88/16 | 14/01009-29 |
| 15 Fíggjarnevndin | 13.04.2016 | 129/16 | 14/01009-29 |
| 16 Býráðsfundur | 19.04.2016 | 105/16 | 14/01009-29 |
| 17 Býráðsfundur | | | 14/01009-29 |

**Málslýsing:**

Áheitan komin frá foreldraráðnum fyri frítíðarskúlarnar í Tórshavnar kommunu um at hava opið arbeiðsdagar, tá skúlin er stongdur, harumframt heita tey á kommununa um at víðka frítíðarskúlan til eisini at fevna um 3. flokk.

Umsitingin hevur kannað møguleikan fyri at  frítíðarskúlin hevur opið dagar, tá skúlin er stongdur og er komin til ta niðurstøðu, at frítíðarskúlin hevur opið 2., 3. og 4. apríl og 10. til og við 13. apríl. Opið er í summar frá 2. juli til og við 20. juli og eina viku í heystfrítíðini. Harumframt skulu frítíðarskúlarnir hava opið 3 dagar afturat, har hin einstaki frítíðarskúlin lagar seg eftir skúlanum, hann er tengdur at. Mælt verður til, at frítíðarskúlarnir leggja saman í summarfrítíðini og aðrar skúlafrídagar, tá til ber at leggja saman, so øll tey, ið hava tørv á frítíðarskúla, fáa tilboð. Nevndu dagar hevur frítíðarskúlin opið frá kl. 08.00 til 17.00. Tað er uppgávan hjá frítíðarskúlunum at samskipa, hvussu frítíðarskúlarnir hava opið í mun til tørvin. Skipanin verður endurskoðað eftir heystfrítíðina 2012.

Mettur kostnaður at víða upplatingartíðina er kr. 350.000 um árið. Peningurin fer av játtanini hjá dagrøktini, ið leyp av í fjør, orsakað av, at dagrøktin ikki hevði fult tal av børnum í mun til normeringina. Tað er uppgávan hjá frítíðarskúlunum at halda seg til játtanina, ið er sett av til endamálið.

Sum nevnt omanfyri, heita foreldraráðini á Tórshavnar kommunu um at víða frítíðarskúlan til eisini at vevna um 3. flokk. Umsitingin hevur kannað møguleikan og hevur í hesum sambandi havt samband  við frítíðarskúlarnar.  Ætlanin er at bjóða børnunum í 3. flokki líknandi tilboð, sum vit bjóða í Margarinfabrikkini, t.v.s. eitt frítíðartilboð.  Eitt frítíðartilboð hevur nøkulunda tað sama at bjóða sum ein frítíðarskúli, við verkstøðum, ítrótti og møguleika við spæli yvirhøvur. Børnini, ið taka av hesum tilboði ganga frá skúla sjálvi og verða ikki skrásett uppá

á sama máta, sum í frítíðarskúlanum. Frítíðarskúlarnir eru ymiskir, t.d. hava vit ein náttúrufrítíðarskúla í Havnardali, við djórum og fríari náttúru. Aðrir frítíðarskúlar hava góða møguleikar fyri ítrótti.

Í løtuni ganga 626 børn í frítíðarskúla, taka vit ein árgang eru tey um 300, tekur helmingurin av børnunum úr 3. flokki av tilboðnum, verða útreiðslurnar frá 15. august kr. 896.250 til 1. januar 2013. Útreiðslurnar til 3. flokk t. v. s. tímar til starvsfólk og rakstur yvirhøvur, eru helmingurin av tí, tær eru til 1. og 2. flokk í frítíðarskúla.

Í flestu førum rúmast børnini í verandi frítíðarskúlum, men neyðugt verður at útvega hølir í ovari parti av býnum. Mettar útreiðslur til leigu fyri 1 ár eru kr. 200.000. Útreiðslur til útgerð og tilfar er kr. 200.000.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin fyri børn og ung mæla mentamálanevndini at játta kr. 350.000 av konto 3101 hjá Dagrøktini til frítíðarskúlarnar í sambandi við at tey hava opið skúlafrídagar. Eisini verður mælt til at játta kr. 896.250 til rakstur og kr. 400.000 til húsaútreiðslur, útgerð og tilfar til frítíðartilboð fyri børnum í 3. flokki. Peningurin verður játtaður av kontu 3215 sparingar í sambandi við verkfallið.

**Mentamálanevndin 18. apríl 2012:** Ein meiriluti, Jógvan Arge, Halla Samuelsen og Rúni Djurhuus taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein og Vagnur Johannesen, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndn 26. apríl 2012:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Elin Lindenskov og Bogi Andreasen, tekur undir við mentamálanevndini og beinir málið í býráðið til kunningar.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen, tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðið 2. mai 2012:** Kunnað varð um málið.

**Mentamálanevndin 6. februar 2013:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Umsitingin leggur fram eftirmeting til umrøðu.

**Mentamálanevndin 5. juni 2013:** Málið varð umrøtt.

**Ískoyti:**
Við knøppu tíðini í huga og teim óvissum um, hvørt kommunan klárar at hava høli tøk til frítíðarskúla til 3. flokk í allari kommununi, eins og at arbeitt verður við endurskoðan av stovnsøkinum, verður mett skilabest fyribils at halda fram við verandi frítíðartilboðið til 3. flokk komandi skúlaár.

Tó verður mett, at ein arbeiðsbólkur umboðandi stovnar, foreldur og umsiting eigur at verða settur beinanvegin at viðgera møguliga alternativa skipan enn størri frítíðarskúli, t.d. klubbatilboð til nakrar skúlaárgangir í allari kommununi, t.d. 3.-5 flokk, og at hetta verður latið mentamálanevndini í seinasta lagi 1. november 2013.

Higartil hevur einki foreldragjald verið galdandi fyri tilboðið til 3. flokk, undantikið eitt tilmeldingargjald á 400 kr. við skúlaársbyrjan. Á Velbastað og í Nólsoy hevur frítíðarskúlin

havt vanligt frítíðarskúlatilboð til 3. flokk samsvarandi samanleggingaravtaluni, tá kommunurnar løgdu saman, við somu starvsfólkanormering og sama gjaldi sum frítíðarskúli fyri 1.-2. flokk. Klagað er um henda mun í gjaldinum. Margarinfabrikkin hevur eisini havt børn úr 3. flokki, tó er onnur skipan galdandi, har hesi rinda 400 kr. um árið sum limagjald.

Til tess at fáa greiðari mynd av tørvinum og veruliga brúkinum, er fyrimunur at hava eitt foreldragjald á sama hátt sum á stovnsøkinum annars. Við støði í normeringini kundi gjaldið verið umleið 400 kr. um mánaðin. Tað krevur, at øll børnini við skúlaársbyrjan velja og verða skrásett til ávísan frítíðarskúla. Ikki allir frítíðarskúlar koma at hava tilboð til 3. flokk vegna plásstrot. Við hesum ber heldur ikki til at ganga á fleiri frítíðarskúlum í senn, so sum uppleggið til skipanina annars var.

Støða skal takast til, um slíkt mánaðarligt foreldragjald til hetta tilboð skal hava somu rættindi til fíggjarligt frípláss og systkinaavsláttur sum vanligi frítíðarskúlin. Verður tilboðið til 3. flokk mett sum ansingartilboð, so má metast, at foreldur hava rætt til bæði fíggjarligt frípláss sambært dagstovnalógini § 6 og systkinaavsláttur sambært upptøkureglunum § 12. Á sama hátt verða reglurnar um 2 mánaðar freist at siga upp plássið galdandi.

Verður tilboðið mett sum virkistilboð á sama hátt sum Margarinfabrikkin, kann støðan í útgangsstøðinum metast vera ein onnur. Virkistilboð í frítíðarskúlunum kann skipast við mánaðarligum foreldragjaldi, men uttan rætt til fíggjarligt frípláss, systkinaavsláttur og uttan skyldu um 2 mánðarar uppsagnartíð við gjaldi. Tað er tá meira upp til, hvat tænastustøði býráðið ynskir at veita í mun til gjøld. Gerast skal vart við, at frítt er at velja frá tilboðið til 3. flokk í frítíðarskúlunum og heldur brúka tilboðið hjá Margarinfabrikkini. Harumframt er spurningur, um tilboðið til 3. flokk á Velbastað og í Nólsoy skal skipast á sama hátt sum í frítíðarskúlum í kommununi annars, ella um haldast skal fast við skipanina, sum avtalað er í samanleggingini millum kommunurnar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at verandi frítíðartilboð til 3. flokk heldur fram komandi skúlaár, og at settur verður arbeiðsbólkur at gera uppskot til klubbatilboð sum alternativa skipan. Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla harumframt til at áseta foreldragjald uml. 400 kr. um mánaðin til virkistilboð ætlað næmingum í 3. flokki á frítíðarskúlum.

**Mentamálanevndin 13. juni 2013:** Samtykt at halda fram við verandi tilboð til 3. flokk restina av álmanakkaárinum uttan foreldragjald, at børnini verða skrivað til ávísan frítiðarskúla, at settur verður arbeiðsbólkur at gera uppskot til frítíðartilboð til børn í aldursbólkinum 3. flokk og eldri og at hetta arbeiðið verður samskipað við endurskoðanina av stovnsøkinum sum heild.

- Upplegg um frítíðartilboð til børn 3. flokk og eldri verður lagt fram.

**Mentamálanevndin 12. februar 2014:** Umrøtt og avgjørt at skipa ein temadag um frítíðarskúlaøkið í Tórshavnar kommunu 5. mars 2014, kl. 12.00.

**Ískoyti:**
Notat verður lagt fram á fundinum.

**Mentamálanevndin 10. april 2014:** Nevndin samtykti at útvega neyðuga játtan til framhald av verandi frítíðartilboði til 3. flokk skúlaárið 2014/15, og at arbeiðsbólkur verður settur at gera uppskot til frítíðar- og virkishús í býarpørtum eftir leisti líknandi sum Margarinfabrikkin at seta í verk í 2015.

**Ískoyti:**
Tilfar kemur til fundin.

**Mentamálanevndin 7. mai 2014:** Samtykt at heita á umsitingina um tilmæli til fígging av frítíðartilboðnum til 3. flokk fíggjarárið 2014. Harumframt samtykt at heita á umsitingina um tilmæli til at skipa verkætlanartilgongd í sambandi við arbeiðið at gera uppskot til heildarætlan um frítíðar- og virkishús til børn og ung at seta í verk august 2015.

**Ískoyti:**
Á kontu 3215 aðrar útreiðslur barnaansing eru játtaðar kr. 1.150.000 til frítíðartilboðið ætlað 3. flokki í 2014. Skúlaárið 2013/14 eru 84 børn innskrivaði, við støði í eindarkostnaðinum kr. 16.092 er samlaði rakstrarkostnaðurin fyri árið kr. 1.351.728.

Fíggjartørvur er sostatt kr. 201.728.

Møguleiki er at fíggja hetta við foreldragjaldi. Sum skipanin er nú, er bert eitt árlig foreldragjald kr. 400. Um foreldragjald var ásett 25% av rakstrarkostnaðinum (ca. 16.000 pr barn árliga, tvs. foreldragjald uml. 400 kr. um mðr. í 10 mðr), fáast uml. kr 350.000 til vega fyri tey børn, sum hava hoyrt til frítíðarskúlarnar, men ikki Margarinfabrikkina. Hetta reisir spurningin, skulu børnini í triðja flokki, sum halda til í Margarinfabrikkini, eisini gjalda foreldragjald.

Fyrimunur við foreldragjaldi er fastari skipan/stýring, skráseting í ChildCare-skipanini sum øll hini børnini. Hetta gevur eisini neyvari mynd av, hvør nýtslan ella tørvurin reelt er og harvið útreiðslustøðið. Eitt so lágt foreldragjald hevur tó avleiðingar fyri systkinaavsláttraskipanina. Møguleiki er at áseta, at foreldragjaldið er ikki fevnt av rættindum um systkinaavsláttur og fíggjarlig frípláss.

Møguleiki er eisini at fíggja upphæddina innanfyri karmarnar á grein 3 kontu 3213 systkinaavsláttur minninýtsla frá 2013.

**Inklusión, børn við serligum tørvi:**
Kommunan hevur fingið fleiri fyrispurningar og áheitanir frá fólki við børnum, sum hava serligar avbjóðingar, tí higartil hevur játtanin til serligan tørv ikki fevnt um hetta tilboðið vísandi til, at talan er ikki um frítíðarskúla sambært dagstovnalógini.

Uppá fyrispurning frá kommununi um henda praksis svarar løgfrøðiligi ráðgevin hjá Kommunufelagnum, at kommunan hevur neyvan eina desideraða skyldu til at veita brekaðum somu tænastu, sum kommunan hevur eftir § 5 í dagstovnalógini. Hinvegin er talan um eitt tilboð, sum hevur líkheit við tilboð eftir dagstovnalógini. Haraftrat er praksis hjá kommuni eitt sindur øvugt av ST-sáttmálanum um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek, sum eisini er galdandi fyri Føroyar. Hóast hesin sáttmáli ikki ásetir ítøkiligu rættarstøðuna beinleiðis – har má man bíða eftir lóggávu – so er tað partur av góðum fyrisitingarskikki at royna at halda seg til andan í hesum sáttmála, og har sær tað ikki so gott út, at frítíðartilboðini hjá kommununi ikki fevnir um tey, sum bera brek. Inkludering og sektorábyrgd (tvs. tey brekaðu eiga at fáa tilboðið frá tí myndugleika, sum veitir tænastuna) eru sentral í hesum høpi, sigur hann.

Hann reisir eisini spurningin um, hvørjar hjálpartænastur, ið Almannaverkið longu nú veitir hesum barninum í 3. flokki. Um tað longu hevur stuðul, hví kann stuðulin so ikki fylgja við til viðkomandi fríðtíðartilboð hjá kommununi heldur enn, at kommunan skal seta tað sama uppá beinini fyri nógvar pengar?

Samanumtikið sær hann ikki nakra formliga lógarskyldu, men kortini eina røð av argumentum, ið hava meira og minni løgfrøðiligan relevans, sum tala fyri, at eisini børn við breki eiga at inkluderast.

**Fleiri frítíðarskúlar:**
Klagur eru eisini frá foreldrum um, at tann frítíðarskúli, har teirra barn gongur í frítíðarskúla í 2. flokki, ikki hevur tilboðið til 3. flokk. Hetta skyldast plásstrot. Skulu fleiri høli fáast til vega, verður hetta at kosta meira í leiguútreiðslum, sum hædd er ikki tikið fyri í kostnaðarmetingini omanfyri. Tó er tikið við leigukostnaðurin av Immanuel.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin fyri barna- og ungdómsdeildina mæla til at áseta eitt foreldragjald 25% av rakstrarkostnaðinum, alternativt til hetta at játta kr. 210.000 av kontu 3213 systkinaavsláttur. Harumframt verður mælt til prinsippiella støðutakan til inklusiónsspurningin.

**Mentamálanevndin 15. mai 2014:** Samtykt at áseta foreldragjald 25% av rakstrarkostnaðinum til frítíðartilboðið til 3. flokk bæði í frítíðarskúlum og Margarinfabrikkini. Harumframt samtykt at heita á umsitingina um beinanvegin at taka upp samráðingar við landsmyndugleikarnar um skipan við stuðlum hjá børnum við serligum tørvi í sambandi við frítíðartilboðið eitt nú við atliti at, at peningurin fylgir barninum, og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 19. maj 2014:** Útsett.

**Fíggjarnevnd 06. juni 2014:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Jógvan Arge og Annfinn Brekkstein samtykkja, at verandi frítíðarskúlatilboð heldur fram fíggjarárið 2014 út við foreldragjaldið áljóðandi 25% av rakstrarkostnaðinum og at leggja málið fyri býráðið.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen, tekur ikki undir við mentamálanevndini vísandi til, at talan er ikki um eitt skipað tilboð fyri alla kommununa, og kommunan ikki hevur tikið støðu til, um 3. flokkur yvirhøvur skal umfatast av frítíðarskúlatilboði.

**Býráðsfundir 16. juni 2014:** Einmælt samtykt at taka undir við meirilutanum í fíggjarnevndini.

**Mentamálanevndin 24. juni 2014:** Málið umrøtt. Trivnaðarstjórin sendir nevndini uppskot til loysn.

**Ískoyti:**
Áheitanin frá mentamálanevndini á trivnaðarstjóran um uppskot til loysn verður fatað sum prinsippiel støðutakan til, at børn við serligum tørvi, sum taka lut í frítíðartilboðnum til 3. flokk, skulu hava í minsta lagi somu treytir til stuðul og ráðgeving, sum tey, ið ganga í vanligum frítíðarskúla. Uppskotið til loysn er tí við støði í hesum.

Kommunan hevur tvær høvuðsfyriskipanir til børn við serligum tørvi. Onnur fyriskipanin er, stovnar kunnu søkja um námsfrøðiliga ráðgeving frá ráðgevaratoyminum hjá barna- og ungdómsdeildini til eitt ávíst barn í samráð við foreldrini. Hin fyriskipanin er, at tá eitt barn hevur tørv á ávísum námsfrøðiligum tiltaki, sum krevur fleiri resursir enn tær, sum vanliga eru á stovninum, kann stovnurin í serligum førum søkja um eyka tímar  (fígging til øktan starvsfólkatørv).

Í fíggjarætlanini er námsfrøðiliga ráðgevingin fíggjað á kontu 3211, meðan tímarnir til stovnarnar verða játtaðir av kontu 3212 Tímar vegna serligan tørv. Umsitingin metir, at umleið 10-12 børn við serligum tørvi væntast at taka av frítíðartilboðnum til 3. flokk næsta skúlaár. Fyri tíðarskeiðið august-desember 2014 verður hetta mett at kosta uml kr. 300.000 kr.

Mett verður, at økt virksemi í mun til 3. flokk fær ikki stórvegis avleiðingar fyri fíggjarstøðuna á kontu 3211 Námsfrøðiliga ráðgevingin, men fíggjarstøðan á kontu 3212 Tímar vegna serligan tørv loyvir ikki at økja um virksemið til 3. flokk eisini.

Nýtslan á kontu 3212 hevur síðstu árini verið vaksandi, uttan at játtanin hevur fylgt við tørvinum í sama mun. Úrslitið er ein framflutt meirnýtsla frá 2013 uppá kr. 552.000, og framroknað meirnýtsla fyri 2014 er kr. 775.00, sum hædd má takast fyri í fíggjarætlanin 2015.

Til tess at tálma vøksturin hevur umsitingin gjørt av at eftirhyggja fyriskiparnirnar bæði í mun til treytir um tørv, áðrenn tímar verða játtaðir, og um tímarnir kunnu gagnnýtast betri. Hetta væntast liðugt í heyst sum íkast til fíggjarætlanarviðgerðina.

Í mun til børnini í 3. flokki, so ber til at játta eykafígging til hetta økta virksemið august-desember 2014, og at hædd annars verður tikin fyri hesum í fíggjarætlanini 2015.

Vísandi til, at eingin nýtsla higartil hevur verið á kontu 3210 Hjálp vegna vantandi barnaansing, verður mett møguligt at játta kr. 300.000 av hesi kontu til økta virksemið í sambandi við frítíðartilboðið til 3. flokk fyri tíðarskeiðið august-desember 2014.

Trivnaðarnevndin og mentamálanevndin vara av hesi kontu, eins og hesar báðar nevndr vara av kontu 3211 Námsfrøðiliga ráðgeving og kontu 3212 Tímar vegna serligan tørv. Skal eykafígging játtast av kontu 3210 og skulu fyriskipanirnar til børn við serligum tørvi víðkast til frítíðartilboðið til 3. flokk eisini, eiga báðar nevndir at samtykkja tað, áðrenn tað fer í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin mælir til,

- at fyriskiparnirnar námsfrøðilig ráðgeving og tímar vegna serligan tørv eisini fevna um børn við serligum tørvi í frítíðartilboðnum til 3. flokk,
- at tað í hesum sambandi verða játtaðar kr. 300.000 av kontu 3210 Hjálp vegna vantandi barnaansing til kontu 3212 Tímar vegna serligan tørv fyri tíðarskeiðið august-desember 2014, og
- at hædd verður tikin fyri hesum í fíggjarætlanini 2015.

Ein meiriluti í trivnaðarnevndini: Bjørghild Djurhuus, Sigrun Mohr og Halla Samuelsen  tóku um teldupost undir við tilmælinum og formliga góðkenna á fyrst komandi fundi í trivnaðarnevndini. Marin Katrina Frýdal og Annfinn Brekkstein hava ikki svarað.

Ein meiriluti í mentamálanevndini: Helena Dam á Neystabø, Sigrun Mohr og Tróndur Sigurðsson tóku um teldupost undir við tilmælinum og formliga góðkenna á fyrst komandi fundi í mentamálanevndini. Bogi Andreasen og Jógvan Arge hava ikki svarað.

**Mentamálanevndin 03. juli 2014:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Bogi Andreasen og Elin Lindenskov, taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevnd 03. juli 2014:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini við teirri broyting, at tilboðið er galdandi fíggjarárið 2014 og at beina málið í býráðið.

Harumframt víst til samtykt í mentamalanevndini 15. mai 2014 um samráðingar við landsmyndugleikarnar.

**Býráðsfundir 03. juli 2014:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Vísandi til samtykt í mentamálanevndini 7. mai 2014 um heildarætlan fyri frítíðar- og virkishús til børn og ung verða lagdar fram metingar um rakstrarkostnað.

**Mentamálanevndin 3. september 2014:** Umrøtt. Nevndin heitir á fyrisitingingina um at kanna hvussu býráðssamtyktin 3. juli 2014 verður útint.

**Ískoyti:**
Frítíðartilboðið til 3. flokk í skúlanum á Argjahamri hevur í ár hildið til í lærarastovuni. Skúlin ynskir ikki hesa loysn at halda fram. Pláss er ikki í frítíðarskúlanum, nú forskúli eisini er aftrat 1.-2. flokki.

Frítíðarskúlin hevur víst á fyribil loysn til næsta skúlaár í skúlanum. Komandi 3. flokkur hevur bert 25 næmingar og brúkar eitt flokshøli. Stovan hinumegin flokshølinum hjá flokkinum er tómt. Einasta stig, ið skulu gerast, er at gera hølini klár, m.a. at skifta okkurt skúlainnbúgv út við frítíðarinnbúgv.

Skúlin er ikki sinnaður til hesa loysn, og vísir á, at skúlin er góðkendur sum 2-sporaður skúli. Til ber ikki at taka eina floksstovu burturúr, tí undirvísingin krevur fleiri møguleikar fyri arbeiðsplássi, og ein flokkur-ein stova er ikki longu galdandi, men at fleiri møguleikar skulu verða í boði til hvønn flokkin. Eisini verður víst á, at fyrispurningur er um at fáa næming inn í 3. flokk. Skúlin ynskir ikki enn eina “hovsaloysn”, tí tað hevur havt ómetaliga keðiligar avleiðingar fyri starvsfólkasamstarvið á stovnunum báðum. Eisini vísir skúlin á, at møguligar bygnaðarbroytingar í skúlanum skulu viðgerast í skúlastýrinum.

Mett verður ikki, at talan er um formella bygnaðarbroyting, men um annað brúk av skúlans hølum í eitt styttri tíðarskeið.

Um tilboðið til 3. flokk ikki skal vera í skúlanum á Argjahamri, so eru alternativini hesi:

- At kommunan leigar AB-húsið til 3. flokk undir leiðslu av frítíðarskúlaleiðaranum á Argjahamri. Fyrimunur er, at hetta er á Argjum. Vansi er, at frítíðarskúlin skal deila hølini við AB, og at fígging skal til keyp av útbúnaði og klárgering. Flokkurin er bert 25 næmingar, og normeringin ber ikki tvey starvsfólk, so neyðugt er við meirnormering. Um ikki øll melda til, men bert t.d. 15, so krevst ein eykafígging til normering uppá uml. kr. 175.000, og fíggjarliga er hetta viðkvæmt í mun til sjúkrameldingar og harvið fíggjartørv til vikar. Møguliga er neyðugt við skipaðum flutningi, tað er uml. 1,5 km at ganga niðan, har opið er fyri vindi og veðri. Kostnaðurin av hesum ógreiður.

- At 3. flokkur fer í Spíran í Havnardali. Fyrimunur er, at hetta er í regi av frítíðarskúlanum í Hornabø og ávirkar ikki eyka normeringstørv til starvsfólk annað enn barnatalið. Fyrimunur er eisini, at alt er klárt. Vansi er, at neyðugt er við skipaðum flutningi av Argjahamri til Spíran í Havnardali. Við støði í kostnaðinum til flutning Hornabø-Spírin, skal roknast við fíggjartørvi til flutning uppá uml. kr. 100.000.

- At 3. flokkur fer í Margarinfabrikkina. Fyrimunur er, at tað krevur ikki nakað eyka til klárgering ella eyka starvsfólkanomering annað enn barnatalið. Vansi er, at Margarinfabrikkin er ikki frítíðarskúli, og 3. flokkur á Argjahamri verður tí einasti flokkur, sum hevur frítíðaritlboð uttan fyri regi av frítíðarskúlunum. Hinvegin er Margarinfabrikkin pedagogiskur stovnur. Fyrimunur er eisini, at bussleiðin koyrir av Argjahamri til miðbýin ókeypis.

Loysnin á Argjahamri og í Margarinfabrikkini hevur ikki tørv á meirfígging. Loysnin á Argjahamri er mest uppløgd fyri næmingarnar og fíggingina, eisini normeringar, men skúlin ynskir ikki hesa loysn í mun til skúlavirksemið. Loysnin í Spíranum kostar í flutningi. Loysnin í AB-húsinum krevur eyka normering.

Síðani frítíðartilboðið til 3. flokk varð skipað, hava á hvørjum ári verið trupulleikar við hølisviðurskiftum. Setast eigur í kortið ein varandi loysn hesum viðvíkjandi, áðrenn skúlaárið 2016/2017.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla í fyrsta lagi til loysn á Argjahamri, í øðrum lagi til loysn í Spíranum í Havnardali treytað av játtan til bussflutning.

**Mentamálanevndin 15. juni 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum um hølisloysn á Argjahamri.

**Ískoyti:**
Barna- og ungdómsdeildin hevur saman við avvarðandi frítíðarskúlaleiðarum tikið saman um royndirnar við frítíðartilboðnum til 3. flokk og mett um, hvussu tilboðið skal skipast framyvir, harundir tørvin á varandi hølisloysnum. Sí skjal: «Eftirmeting av verandi frítíðartilboðum til 3. flokk og boð uppá varandi hølisloysnir.»

Boð uppá varandi loysnir eru:
- Byggja frítíðarskúlan á Argjahamri út eisini til ungdómstilboð
- Flyta ella skipa Spíran á øðrum náttúrustað

- Byggja frítíðarskúlan í Badmintonhøllini út til 3. flokk
- At flyta tilboðið í Hoyvík inn í frítíðarskúlan í Hoyvík
- Margarinfabrikkin hevur framhaldandi tilboð eisini til 3. flokk
-

Til komandi skúlaár verður lagt upp til hesar hølisloysnir:

- Tilboðið heldur fram í skúlanum á Argjahamri, men nýggj hølisloysn má finnast
- Tilboðið í Spíranum heldur fram
- Tilboðið í KFUM heldur fram, møguliga knýtt at leiðsluni í Badmintonhøllini
- Tilboðið í Hoyvík verður flutt inn í frítíðarskúlan í Hoyvík
- Margarinfabrikkin hevur framhaldandi tilboð eisini til 3. flokk

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin fyri barna- og ungdómsdeildina mæla til umrøðu av eftirmetingini og støðutakan til a) uppskot til varandi hølisloysnir og b) hølisloysnir til komandi skúlaár.

**Mentamálanevndin 06. april 2016:** Samtykt at taka undir við omanfyri standandi loysnum fyri næsta skúlaár. Harumframt verður mælt til at byggja frítíðarskúlan á Argjahamri út saman við útbyggingini av fimleikahøllini, og at kanna møguleikan fyri at byggja Badmintonhøllina út til frítíðarskúlaendamál og beina málið í fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**
Víst verður til samtykt um at byggja frítíðarskúlan á Argjahamri út saman við útbyggingini av fimleikahøllini.

Í sambandi við, at fimleikarhøllin verður bygd út til ítróttahøll, er møguleiki at byggja frítíðarskúlan út samstundis. Sum bygningspartar eru teir sambygdir.

Verkætlanin við at byggja ítróttahøllina er samtykt, og síðsta hond verður lagt á prosjektering v.m. Skal útbyggingin av frítíðarskúlanum knýtast uppí uttan at órógva byggingina av ítróttahøllini, skal avgerð takast um tað beinanvegin, eins og tað at koma afturumaftur seinni verður munandi dýrari.

Í mun til barnatalið, ið er á stovninum nú, er hann ov lítil. Frítíðarskúlin er bygdur til tveir árgangir. Við forskúla og triðja flokki eru reelt fýra árgangir knýttir at frítíðarskúlanum. Umframt at loysa upp fyri hesum, kann útbyggingin tryggja høli til ungdómsklubb-tilboð á Argjum eftir sama leisti sum í t.d. Hoyvík.

Talan er um møguleika at byggja 130 m2 aftrat. Kostnaður at inniloka endan (rábygning uttan vindeygu v.m.) er mett til uml. kr. 150.000. Innrætting, tekniskar installatiónir og klárgering vm. verður mett at kosta kr. 1,6 mió.

Í mun til at fáa tryggjað, at útbyggingin av rábygninginum kann fremjast saman við ítróttahøllini, skulu kr. 150.000 játtast til endamálið. Hetta kann fíggjast við at flyta part av minninýtslu hjá frítíðarskúlanum á Argjahamri konta 3142 til íløguverkætlanina. Støðutakan til fígging av innrætting v.m. kann takast uppaftur seinni.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, leiðarin fyri barna- og ungdómsdeildina og mentamálaleiðarin mæla til at byggja frítíðarskúlan á Argjahamri út saman við byggingini av ítróttahøllini. Til tess í fyrsta umfari at fáa bygt rábygningin verður mælt til at játta kr. 150.000 av kontu 3142 frítíðarskúlin á Argjahamri til íløgukontu 5775 L57025 útbygging av høllini í skúlan á Argjahamri.

**Fíggjarnevndin 13. april 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið sum eykajáttan at viðgera tvær ferðir.

**Býráðsfundur 19. apríl 2016:** Einmælt samtykt.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>19. apríl 2016 | Blað nr.: 12987<br>Formansins merki: |

## 106/16 Umsókn frá Eysturskúlanum um játtan at keypa 27 fót glastrevjabát

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 07.04.2015 | 65/15 | 14/05223-3 |
| 2 Mentamálanevndin | 02.03.2016 | 65/16 | 14/05223-3 |
| 3 Fíggjarnevndin | 09.03.2016 | 95/16 | 14/05223-3 |
| 4 Býráðsfundur | 17.03.2016 | 76/16 | 14/05223-3 |
| 5 Býráðsfundur | 19.04.2016 | 106/16 | 14/05223-3 |

**Málslýsing**:
Í umsókn dagfest 24. november 2014 søkir Eysturskúlin um játtan at keypa glastrevjabát.

Á sjóvinnubreytini í Nám X hava næmingar, sum hava áhuga fyri okkara høvuðsvinnu og áhuga sjóvinnu sum lívsstarv, møguleika at nema sær átøðiliga og praktiska vitan og royndir.

Sjóvinnubreytin í Eysturskúlanum er býtt í tveir partar, annar er sjógvurin og praktisk læring, hin er ástøðilig undirvísing.

Í praktiska partinum læra næmingarnir um sjómansskap, og tá tað viðrar eru teir á floti og hava møguleika at royna ymsan reiðskap.

Ástøðilgi parturin er undirvísing, sum er skipað av lærarum í Vinnuháskúlanum og við skúlaárslok hava næmingarnir møguleika at fáa prógv fyri frítíðarsiglarar. Aftrat hesum fáa næmingarnir trygdasrskeið.

Samanumtikið er undirvísingin á sjóvinnubreytini í Nám X fjølbroytt og førleikagevandi.

Praktiski parturin á sjónum er treytaður av, at næmingar hava atgongd til bát. Eysturskúlin hevur í løtuni atgongd til tríggjar bátar, men teir eru allir privatogn, og tveir teirra eru ikki so væl egnaðir til endamálið. So í grundini er bert tann eini báturin, men tað fer ikki at halda fram, tí hann er privatogn, og eigarin skal eisini sjálvur brúka bátin. Um skúlin ikki hevur atgongd til bát, verður sjóvinnubreytin nógv skerd.

Eysturskúlin hevur vent sær til Bátafelagið, men útlitini at fáa avtalu um at brúka ein bát, sum altíð er tøkur, tá skúlin skal brúka hann, eru ikki góð. Skúlin hevur søkt um stuðul frá Kiwanis og Lions, og hevur fingið svar frá báðum, at feløgini ikki kunnu lata stuðul til endamálið, tí umsóknin liggur uttan fyri virkisøkið hjá teimum.

Eysturskúlin søkir um heimild og stuðul at ogna sær bát til Nám X. Báturin skal í minsta lagi vera 27 føtur, vera frambygdur og hava dekk. Kostnaðurin fyri ein tílíkan glastrevjabát er 150.000 – 200.000 kr.

Skúlaárið 2015/2016 hava 25 næmingar søkt inn á sjóvinnubreytina í Nám X.

Skúlin átekur sær vanliga røkt og rakstrarútreiðslur av bátinum.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til ikki at játta stuðul til endamálið, men mæla skúlanum til at fáa í lag avtalu um atgongd til bát ella bátar, sum hóskar til undirvísingarvirksemið.

**Mentamálanevndin 07. april 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Mentamáladeildin og Eystursk úlin hava roynt at funnið loysn viðvíkjandi brúksrætti til ein bát til sjóvinnubreytina í Nám X, men tað er ikki eydnast at finna nakran, sum er sinnaður at gera avtalu um nýtslu av báti, sum skal vera tøkur hjá sjóvinnubreytini, allar teir dagar, ið breytin skal brúka bát.

Umsitingin hevur sett seg í samband við Tórshavnar Havn við fyrispurningi um at brúka ein bát, sum havnin brúkar í sambandi við ymiskt arbeiði í havnini. Men tann báturin er ikki egnaður til endamálið.

Fram er so ein annar møguleiki, men skúlin metir ikki, at hann ikki er ein bátur, sum kann brúkast til sjóvinnubreytina í Nám X.

Komandi skúlaár hevur Sjóvinnubreytin í Nám X ikki atgongd til nakran bát, og um eingin loysn er, ber ikki til at hava breytina, og hon verður so ikki ein valmøguleiki. Breytin er vælumtókt, og báturin er í grundini fakhøli hjá sjóvinnubreytini, eins og køkurin er fakhøli hjá húsarhaldsbreytini.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta Eysturskúlanum 200.000 kr. til keyp av glastrevjabáti av kontu 5370 stuðul til íløgur.

**Mentamálanevndin 02. marts 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum. Nevndin vil hava málið eftirmett eftir eitt skúlaár.

**Fíggjarnevndin 09. marts 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og játta kr. 200.000 sum eykajáttan av konto 5370 á konto 4118 og at beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 17. mars 2016:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 19. apríl 2016:** Einmælt samtykt.

# 107/16 Umsókn um stuðul til umvæling av Tórshavnar ítróttar- og samkomuhøll - skeyti 1386 - ymiskt tilfar í eini kassettu (1999-0345)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 20.10.2014 | 203/14 | 14/04763-136 |
| 2 Mentamálanevndin | 06.10.2015 | 202/15 | 14/04763-136 |
| 3 Mentamálanevndin | 09.11.2015 | 225/15 | 14/04763-136 |
| 4 Fíggjarnevndin | 11.11.2015 | 275/15 | 14/04763-136 |
| 5 Mentamálanevndin | 25.11.2015 | 234/15 | 14/04763-136 |
| 6 Fíggjarnevndin | 02.12.2015 | 299/15 | 14/04763-136 |
| 7 Býráðsfundur | 10.12.2015 | 237/15 | 14/04763-136 |
| 8 Mentamálanevndin | 07.12.2015 | 254/15 | 14/04763-136 |
| 9 Fíggjarnevndin | 09.12.2015 | 332/15 | 14/04763-136 |
| 10 Mentamálanevndin | 13.01.2016 | 3/16 | 14/04763-136 |
| 11 Fíggjarnevndin | 20.01.2016 | 15/16 | 14/04763-136 |
| 12 Býráðsfundur | 28.01.2016 | 10/16 | 14/04763-136 |
| 13 Mentamálanevndin | 02.03.2016 | 72/16 | 14/04763-136 |
| 14 Mentamálanevndin | 06.04.2016 | 109/16 | 14/04763-136 |
| 15 Fíggjarnevndin | 13.04.2016 | 131/16 | 14/04763-136 |
| 16 Býráðsfundur | 19.04.2016 | 107/16 | 14/04763-136 |

## Málslýsing:
Á fundi í býráðnum 23. september 2004 varð m.a. samtykt at gera eina byggitekniska meting av høllini.

Byggideildin hevur havt samstarv við BBP Arkitektar A/S um at útbyggja og umvæla høllina. Byggideildin hevur á fundi í býráðnum 30. mars 2006 kunnað um ætlaðu umbyggingina av Ítróttarhøllini á Hálsi.

Í uppskotinum er ein kostnaðarætlan og ein tíðarætlan.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at fara undir at gera hesa verkætlanina so skjótt sum til ber. Tað kann ikki metast ráðiligt at halda fram við at lappa uppá verandi høll. Ei heldur má tað metast ráðiligt at fara undir at umvæla høllina bert fyri at fáa hana í brúkiligan stand tó uttan at tillaga hana til øktan tørv og krøv til nýtslu.

Høllin á Hálsi hevur altíð staðið sum ímyndin av føroyskum innanduraítrótti, harumframt at vera stoltleikin fyri samkomu- og ítróttarvirksemi í Tórshavn. Hetta eigur Tórshavnar kommuna, sum landsins høvuðsstaður at leggja seg eftir at kunna siga um Høllina á Hálsi framyvir.

**Tilmæli:**
Mentamálaleiðarin mælir mentamálanevndini til at taka undir við tilráðingini frá býararkitektinum.

**Mentamálanevndin 24. mai 2006:** Nevndin var á staðnum og var víst runt í høllini.

**Uppískoyti/tilmæli:**

Høllin, ið er yvirtikin av Tórshavnar kommunu fyrst í 2005, er niðurslitin, og tørvar átrokandi ábøtur. Fyri at fáa sum mest burtur úr eini so umfatandi umvæling, hava vit mett rættast eisini at hava við í hesum arbeiði eina dagføring av høllini, ið alt annað enn líkur krøvini, ið eru til eina tílíka høll í dag. Tí fyriliggur eitt skitsuuppskot, sum tekur støði í hesum. Atlit eru eisini tikin til, at hon framhaldandi, eftir at arbeiðið er gjørt, fer at verða "høllin" í Føroyum. Býararkitekturin hevur sagt um skitsuuppskotið, at hetta er eitt av teimum betru.

Í skitsuuppskotinum er samantvinna umbygging, uppíbygging og um-væling. Sambært kostnaðarmetingini hjá BBP-arkitektum kostar arbeiðið kr. 32.850.000 (danskir prísir, primo 2006)

Afturat hesum kemur projekterings- og ráðgevaraútreiðslur, kr. 3.942.000 (12% av 32 mill kr.).

Av tí at uppskotið ikki bert inniheldur viðlíkahald, men eisini uppíbygging v.m., halda vit tað er rætt eisini at býta samlaða metingina upp í tveir partar. Annar er umvælingarparturin og hin er uppí- og umbyggingar parturin.

Út frá kostnaðarmetingini kemur fram, at kostnaðurin fyri alt arbeiðið er í "føroyskum kr" 37.777.500 mill. kr. Deila vit hetta upp í áður umtalaðu partar, fáa vit hesa uppdeiling:

| | | |
|---|---|---|
| Umvæling | kr. | 21.903.095 |
| Uppí- og umbygging | - | 15.874.405 |
| Samlað | kr. | 37.777.500 |

Í fjør játtaði býráðið 2,5 mill. kr. á konto 82 til Høllina á Hálsi at gera umvælingar fyri í 2006.

Býararkitekturin mælir til at tikið verður av øðrum av niðanfyri standandi tilmælum. Bæði ganga uppá at fáa sett projekteringsarbeiði í gongd nú.

Í tí fyrra tilmælinum verður mælt til, at arbeiðið verður gjørt út í eitt. Hetta hevur við sær, at eingin kann brúka høllina í byggitíðini, sum ætlandi verður liðug í september 2008.

Tað seinra mælir til, at arbeiðini verða gjørt í 4 byggistigum, soleiðis at yvir eitt rímiligt tíðarskeið stendur høllin liðug, sum skitsuuppskotið leggur upp til.

**1. tilmæli**

at projekteringin av skitsuuppskotinum verður gjørt av BBP-arkitektum, sum hava tillagað eina nýggja tíðarætlan. Teir kunnu byrja uppá projekteringina miðjan august í ár og hava hana lidna miðjan mai 2007. Arbeiðið kann byrja fyrst i juli 2007 og halda fram, til tað er liðugt, áðrenn hondbóltskappingin byrjar aftur í september 2008.

at játtanin til konto 82 verður hækkað við teim knapt 22 mill. kr., og tær írestandi knapt 16 mill. kr. sum íløga ella tiknar sum lán. Projekteringskostnaðurin verður goldin av teim 2,5 mill. kr., sum eru á konto 82, og tær írestandi 1,4 mill. kr. verða deildar soleiðis, at 1 mill. fer til konto 82 og 0,4 mill. kr. sum íløga ella lán. Sett upp í skema sær tað soleiðis út yvir 2 fíggjarár:

| | |
|---|---|
| Hækka játtanina til konto 82 | kr. 21.903.095 |
| Partur av projekterings og ráðgeving | - 1.000.000 |
| Samlað hækking til konto 82 | kr. 22.903.095 |

| | |
|---|---|
| Játtan til íløgu ella at upptaka lán | kr 15.874.405 |
| Partur av projektering og ráðgeving | - 442.000 |
| Samlað íløga ella lántøka | kr. 16.316.405 |

Hækkan av játtan til konto 82 og játtan til íløgu ella lántøka verða gjørd yvir eitt tvey ára skeið, so hvørt sum tørvur er á peningi.

| | |
|---|---|
| Fyri fíggjarárið 2007 verður játtanin til konto 82 hækka við | kr. 12.000.000 |
| Og íløga ella lántøka verða gjørd fyri fíggjarárið 2007 við | kr. 8.000.000 |

| | |
|---|---|
| Fyri fíggjarárið 2008 verður játtanin til konto 82 hækka við | kr. 11.000.000 |
| Og íløgan ella lántøka verður gjørd fyri fíggjarárið 2008 við | kr. 9.000.000 |



Omanfyri sæst tíðaraksin fyri projektering og byggitíðina, um arbeiðið verður gjørt út í eitt.

**2. tilmæli**
Í øðrum lagið verður mælt til at projektið verður gjørt liðugt, soleiðis at partar av arbeiðnum kunnu longu byrja í 2007. Arbeiðið kann tá leggjast soleiðis tilrættis, at tað verður boðið út í størri og minni bitum alt eftir tí, sum er best byggitekniskt, og sum pengar verða settir av til.

at peningur verður settur av soleiðis, at projekteringin kann gerast liðug av BBP-arkitektum miðskeiðis í apríl 2007. Hetta fyri at umvælingararbeiðið kann gerast við støði í tí lidna projektinum, soleiðis at arbeiðið verður gjørt í størri og smærri bitum.

at peningur verður settur av til at gera 1. byggistig í fyrstu atløgu, sum umfatar rúmini á eystursíðuna fyrst. Hetta inniheldur at skifta takið, hækka gólvið á hædd við vallargólvið, umvæla og broyta skiftirúmini, wc rúmini og harvið eisini gera kloakkina á nýggjum og asfaltera gongubreytuna. Framsíðan skal gerast eftir tí nýggja uppskotinum, tvs. skifta klædningin út og skifta og broyta vindeyguni og úthurðarnar. Seta nýggja takrennu og rennustokk upp. Hesi arbeiði kunnu gerast við at hækka játtanina til konto 82 við 9 mill. kr. til fíggjarárið 2007.

Ein møgulig langtíðar ætlan kundi verið hendan.

**1. byggistig**
Umvæling og broyting av hølum, ið liggja úti við eystur síðuna. Broyting av hesi framsíðu umfatar eisini vindeygu, úthurðar, takrennu og rennustokkar. Takið skal eisini skiftast.

**2. byggistig**
Útbyggja endan norðureftir, við øllum.

**3. byggistig**
Útbyggja endan suður eftir við øllum.

**4. byggistig**
Taka niður áskoðarabeinkirnar og flyta vøllin inn í mittuna. Gera nýggj áskoðarapláss og umskapa rúmini, sum liggja út til vestur síðuna. Broyting av hesi framsíðu umfatar eisini vindeygu, úthurðar, takrennu og rennustokkar.

**Mentamálanevndin 13. juni 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til, um fíggjarnevndina, at 2,5 mió. kr., sum eru játtaðar til umvælingar av høllini 2006, verða nýttar til projektering av umvæling og umbygging, sambært uppskoti frá BBP Arkitektar A/S, februar 2006.

Eisini samtykt at viðgera málið aftur í mentamálanevndini eftir summarfrítíðina.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2006:** Trivnaðarstjórin og leiðarin á mentamáladeildini vóru á fundinum og greiddu frá.

Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 13. september 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 21. september 2006:** Einmælt samtykt.

**Nýtt:**
Kommunan hevur arbeitt við einum projektið, ið fór at kosta 40 mill kr. umframt projekteringsútreiðslur.

Projekteringin er komin væl áleiðis og sambært sáttmála millum arkitektavirkið og Tórshavnar kommunu (TK) skal projektforslagið góðkennast av TK. Hetta liggur nú klárt til góðkenningar

Samlaði kostnaður fyri projektið er kr 47.680.000 við prístalsregulering og projektering.

Arbeiði gerast í 4 byggistigum.
1. byggistig: 1. februar 2008 – 31.oktober 2008
2. byggistig: 1. januar 2009 – 1. februar 2010
3. byggistig: 1. apríl – 27. august 2010
4. byggistig: 1. september – 30. juni 2011

Arbeiði verður fíggja av konto 90 soleiðis:

| | |
|---|---|
| Áður játtað, | 2.500.000 mill kr. |
| At játtað fyri 2007 | 6.000.000 mill kr |
| At játtað fyri 2008 | 6.415.000 mill kr |
| At játtað fyri 2009 | 14.326.680 mill kr |
| At játtað fyri 2010 | 12.829.240 mill kr |
| At játtað fyri 2011 | 5.599.080 mill kr |

Býararkitekturin mælir til at projektuppskotið, tíðarætlan og fíggingar-háttur verða góðtikin.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við tilmælinum frá býararkitektinum. Somuleiðis verður mælt til at seta bygginevnd fyri verkætlanina, sambært ”Politisku/fyrisitingarligu mannagondir fyri verkætlanir”

**Mentamálanevndin 11. juni 2007:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og mentamálaleiðaranum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 21. juni 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
5 byggifyritøkur vóru innboðnar til at prekvalifisera seg til at bjóða uppá út- og umbyggingina av Høllini á Hálsi. Freistin at lata inn upplýsingar um fyritøkuna varð 6. mars kl 14.00. Av teim 5 boðnu, lótu 4 fyritøkur inn tilfar, og vóru tær allar góðkendar.

Lisitatiónin varð 28. apríl 2008 kl 10:00
Hesi tilboð komu inn

| Fyritøka | 1 byggistig | 3 byggistig |
|---|---|---|
| J & K Petersen Contractors | Einki boð | Einki boð |
| Búsetur Sp/F | kr 58.798.462,80 | kr 64.143.777,60 |
| E.Pihl & Søn Føroyar P/F | kr 64.341.329,28 | kr 69.964.259,00 |
| MT Højgaard Føroyar P/F | kr 70.810.793,03 | kr 76.310.793,03 |

Ráðgevarin BBP-arkitekter, mettu at øll innkomnu tilboð vóru kontosiónsmessig. Víðari mæltu ráðgevin til at tikið varð av tilboðnum frá Búsetur, og at arbeiðið skuldi gerast í einum byggistigi.

Bygginevndin gjørdi hetta tilmæli.

Ein meiriluti í bygginevndin, mælir frá at taka av lægsta tilboðnum áljóðandi 58.798.462,00 kr, fyri at gera arbeiði í einum. Somuleiðis mælir ein meiriluti frá, at taka av lægsta tilboðnum áljóðandi 64.143.777,00 kr, fyri at gera arbeiðið í stigum.

Grundgevingin fyri frámælinum er, at játtaðar eru bert 48 mill. kr. til at gera arbeiðið í stigum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við bygginevndini vísandi til at rúm ikki er fyri verkætlanini á konto 90.

**Mentamálanevndin 3. desember 2008:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevndin 10. desember 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 29. desember 2008:** Atkvøtt var um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen, Elin Lindenskov, Inga Dahl, Vagnur Johannesen, Beate L. Samuelsen og Jan Christiansen.

Greiddu ikki atkvøðu: Sjúrður Olsen og Høgni Mikkelsen

**Uppískoyti:**
Høllin, sum Tórshavnar kommuna yvirtók í 2005, er niðurslitin og tørvar átrokandi ábøtur. Arbeitt hevur verið við at fara undir útbygging av høllini, men býráðið samtykti 29. desember 2008, at arbeiðið verður ikki gjørt í hesum umfari.

Tørvurin á umvælingum í høllini er stórur, og tí verður neyðugt at gera eina tørvsmeting av bráðfeingis umvælingum og kostnaðarmeting.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at framflyta kr.100.000 av játtan til umbygging av høllini á Hálsi til at gera tørvsmeting av bráðfeingis umvælingum og kostnaðarmeting.

**Mentamálanevndin 27. mai 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at játta kr. 100.000 at gera tørvsmeting av bráðfeingis umvælingum við kostnaðarmeting.

**Fíggjarnevndin 28. mai 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og játta kr. 100.000 av játtaðum íløgum á trivnaðarøkinum ætlaðar Høllini á Hálsi.

**Býráðið 28. mai 2009:** Einmælt samtykt.

**Nýtt**:
Tørvsmetingin av bráfeingis umvælingum og kostnaðarmeting er nú gjørd. Eystursíðan treingjur mest til ábøtur. Talan er her um at umvæla/skifta út umklæðingar- og brúsurúm, klædning og toilettir. Kostnaðarmetingin er sett upp í trimum punktum, sí skjálið frá HMP-Consult, dagfest 3. november 2009.

Her verður tikið saman um metingina:

| | | |
|---|---|---|
| Brúsu- og umklæðingarrúm | kr. | 3.484.100 |
| Toilettir | kr. | 861.300 |
| Arbeiðstøka samlað | kr. | 4.895.400 |
| Óvantað 15% | kr. | 734.310 |
| Projektering og eftirlit | kr. | 675.565 |
| | | |
| Samlað uttan mvg | kr. | 6.305.275 |
| Mvg 6,25% | kr. | 390.927 |
| | | |
| Samlað við MVG | kr. | 6.696.202 |

Eftir at hesar ábøtur eru gjørdar, treingir gólvið til at skiftast. Tað er í sera ringum standi, og krevur nógv dagligt viðlíkahald. Men tá hugsað verður um at takið lekur, eigur takið at verða skift áðrenn gólvið, soleiðis at gólvið ikki fær vatnskaða tá takið verður skift.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta 4,4 mió. kr. av avlopinum av áður játtaðari upphædd til Høllina á Hálsi (j. nr. 1999-0345). Tøkar eru íalt 8,9 mió. kr.

**Mentamálanevndin 11. november 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Ískoyti/tilmæli:**
Fyri at gera bráðfangis umvælingar lidnar – mettar til 6,7 mió. kr. – mæla kommunustjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin til at játta 3,0 mió. kr. afturat av undirkonto 5776 í fíggjarætlanini fyri 2010 til arbeiðið.

**Mentamálanevndin 17. november 2009:** Nevndin tók undir við tilmælinum um netið.

**Fíggjarnevndin 18. november 2009:** Nevndin samtykti at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælunum.

**Býráðið fyri læstum hurðum 26. november 2009:** Málið varð umrøtt.

**Býráðið 26. november 2009:** Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini 18. november 2009.

**Ískoyti:**
Jógvan Arge ynskir málið á skrá.

**Fíggjarnevndin 14. apríl 2010:** Tekniski stjórin og býararkitekturin greiddu frá málinum. Sáttmáli verður í næstum gjørdur við HMP Consult um ráðgeving og projektering. Projekteringin tekur upp til tveir mánaðir, og mælt verður til, at arbeiðið verður boðið út í innbodnari lisitatión í summar.

**Mentamálanevndin 28. apríl 2010:** Kunnað varð um málið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at bjóða arbeiðið út í innbodnari høvuðsentreprisu.

**Mentamálanevndin 17. mai 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 20. mai 2010:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Mentamálanevndin 1. september 2010:** Kunnað varð um málið.

**Nýtt:**
Lisitatiónin var 22. des. 2010 og tilboðini vóru hesi:

| | |
|---|---|
| ÁTS S/pf. | 6.117.725,56 kr. |
| Karstin A. Joensen S/pf. | 6.183.979,25 kr. |

| | |
|---|---|
| Valbjørn Dalsgarð S/pf. | 6.302.015,96 kr. |
| Bjarni Poulsen S/pf. | 6.343.814,48 kr. |
| Búsetur S/pf. | 6.545.180,00 kr. |
| Húsavarðatænastan S/pf. | 6.678.556,15 kr. |
| | |
| Metingin hjá HMP-Consult | 6.725.000,00 kr. |

HMP-Consult hava kannað tilboðini, og mæla til at taka upp samráðingar við ÁTS, sum áttu lægsta tilboðið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at heimila umsitingini at taka upp samráðingar og gera sáttmála við ÁTS.

**Mentamálanevndin 12. januar 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Í skrivi til mentamáladeildina dagf. 13. september 2011 vísa leiðarin á Hallarumsitingini og leiðarin á Húsaumsitingini á bráðneyðugan tørv at skifta gólvið og takið. Víst verður á, at gólvið er í sera ringum standi og krevur nógv dagligt viðlíkahald, og tí treingir tað til at skiftast. Víst verður eisini á, at tá hugsað verður um, at takið lekur, eigur takið at verða skift áðrenn gólvið, soleiðis at gólvið ikki fær vatnskaða, tá takið verður skift.
Høllin á Hálsi tørvar eina størri umvæling bæði innan og uttan. Ein heildarumvæling av høllini verður sambært HMP Consult mett at kosta millum kr. 18-20 mió. Á fíggjarætlanini konta 5775 Ítróttaranlegg eru í 2012 settar kr. 2,5 mió av til framhaldandi umvælingar, sambært fíggjarætlanartekstinum skulu m.a. gólvið og takið skiftast. Greitt er, at til ber ikki at skifta bæði gólvið og takið í einum fyri hesa upphædd, men fíggingin røkkur til at skifta gólvið.

Høllin hevur øll árini verið karmur um fleiri ítróttagreinar, samkomutiltøk, handilsmessur, dans og konsertir o.a. mangt. Krøv til gólv eru ymisk, alt eftir, hvat virksemið skal vera – eitt nú skal gólv til ítrótt vera bleytt, tó at krøvini hjá ymsu ítróttagreinunum eisini kunnu vera ymiskt. Gólv til eitt nú at bera bilar skal hinvegin vera hart.

Gamla gólvið hevur víst seg at vera sera gott og haldført. Ætlanin er, at høllin eisini framyvir skal vera karmur um fjøltáttað virksemi. Metast má tí skilagott, at nýggja gólvið verður bygt upp á sama hátt við møguligum smáum betringum. Ætlanin er ikki at broyta høllina annars.

Fyri ikki at órógva kappingarárið 2012-2013 ov nógv, er neyðugt, at arbeiðið at skifta gólvið verður byrjað og gjørt liðugt beinanvegin. Tá takið verður skift, verður neyðugt at verja gólvið væl, so at tað ongan skaða fær. Mælt verður tí til, at tøka íløgujáttanin kr. 2,5 mió verður brúkt til at skifta gólvið.

Fyri at arbeiðið skal ganga so skjótt sum møguligt, verður mælt til, at Húsaumsitingin, í samstarvi við Hallarumsitingina, standa fyri upptøku og burturbeining av gamla gólvinum, meðan arbeiðið at keypa og leggja nýggja gólvið á verður bjóðað út sum undirhondsboð til tveir arbeiðstakarar.

Mett verður tó eisini neyðugt, at gongd verður sett á heildarumvælingarnar, t.e. millum annað at skifta takið, ventilatiónsskipan, klæða allan bygningin uttan, skifta vindeygu og hurðar, dagføra atkomuna, ábøtur á brunaviðurskifti eins og el- og hvs-arbeiði og aðra fríðkan. Til hetta endamálið eigur játtan í alt umleið kr. 20 mió at verða sett av á íløguætlanini fyri árini 2013 og 2014.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 2,5 mió av íløgukontu 5775 Ítróttaranlegg til at skifta gólvið í Høllini á Hálsi. Mælt verður harumframt til, at settar verða í alt umleið kr. 20 mió av á íløguætlanirnar fyri 2013 og 2014 til at umvæla bygningin lidnan.

**Mentamálanevndin 13. juni 2012:** Nevndin samtykti at játta kr. 2,5 mió av íløgukontu 5775 Ítróttaranlegg til at skifta gólvið í Høllini á Hálsi og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein meiriluti Jógvan Arge, Maria Hammer Olsen og Elin Lindenskov mæla til at peningur verður játtaður at skifta takið v.m. í 2013.

Ein minniluti Annfinn Brekkstein og Vagnur Johannesen mæla til at fylgja tilmælinum at settar verða í alt umleið kr. 20 mió av á íløguætlanirnar fyri 2013 og 2014 til at umvæla bygningin lidnan.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og játta kr. 2,5 mió. Av konto 5775, ítróttaranlegg, til at skifta gólvið í Høllini á Hálsi.

**Býráðið 28. juni 2012**: Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeiðið uppá útskifting av gólvplátum og álegging av nýggjum sportslinoleum er boðið út sum undirhondsboð av HMP- Consult, ið eru ráðgevar í málinum. Tilboðini vóru hesi, uttan mvg:

Skifta gólvplátur v.m.

- Træsmiðjan Sp/f 598.210,- kr.
- Articon P/f 537.480,- kr.

- Metingin hjá HMP-Consult 520.000 kr.

Nýtt sportlinoleum v.m.

- Gólvbúni Sp/f. 414.750,- kr.
- Eyðfinn K. Eyðunsson Fa. 388.500,- kr.

- Metingin hjá HMP-Consult 424.000,- kr.

HMP-Consult hava kannað tilboðini og mæla til at skriva arbeiðstøkusáttmála við ávikavist Articon og Eyðfinn K. Eyðunsson, sum áttu lægstu tilboðini.

Eftir samráðingar við Articon um nakrar broytingar, er semja um sáttmálaupphæddina kr. 437,000,-.

Viðv. samlaða fíggjartørvinum verður víst til j. nr. 2012-1785.

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka av tilboðunum við teimum broytingum, sum avtalaðar eru, frá ávikavist Articon á kr. 437.000 og Eyðfinn K. Eyðunsson á kr. 388.500, og at heimila umsitingini at gera arbeiðstøkusáttmálar við hesar.

**Mentamálanevndin 26. juli 2012:** Ein meiriluti: Jógvan Arge, Maria H. Olsen og Elin Lindenskov taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti: Annfinn Brekkstein og Vagnur Johannesen taka støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 26. juli 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka av tilboðunum frá Articon við teimum broytingum, sum avtalaðar eru, og at umsitingin fær heimild til at taka upp samráðingar við Eyðfinn K. Eyðunsson og Gólvbúna Sp/f og gera sáttmála um eitt gólv/sportslinoleum av sama slag sum verandi gólv.

**Býráðið 26. juli 2012:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Høllin á Hálsi hevur stóran umvælingartørv. Í fjør varð gólvið skift (konta 5775, L 57003 Høllin á Hálsi). Sum tað framgongur av málslýsingini omanfyri, er bráðneyðugur tørvur á at skifta takið í høllini. Víst verður eisini á, at ein heildarumvæling av høllini er neyðug, tað er at skifta takið, nýggja ventilatiónsskipan, klæða allan bygningin uttan, skifta vindeygu og hurðar, dagføra atkomuna, ábøtur á brunaviðurskifti eins og el- og hvs-arbeiði og aðra fríðkan.

Við støði í kostnaðarmeting frá september 2011 varð mett, at til hetta endamálið eigur játtan í alt umleið kr. 20 mió at verða sett av á íløguætlanini fyri árini 2013 og 2014. Á íløguætlanini fyri 2013 eru settar kr. 10 mió, sum í høvuðsheitum røkkur til at fáa skift takið og orkusparandi ventilatiónsskipan. Harumframt er eitt avlop á kontu L57003 uppá umleið 1 mió, sum kann verða flutt til tey arbeiði, sum gerast skulu í summar.

Sum fyrireikingar av arbeiðinum skal útbjóðingartilfar gerast. Mælt verður til at bjóða byggiarbeiðið út sum innboðin lisitatión. Ætlandi skal arbeiðið fremjast í summar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at gera útbjóðingartilfar og at bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión. Harumframt verður mælt til at játta kr. 10 mió av íløgukontu 5775 fyri 2013 til arbeiðið.

**Mentamálanevndin 10. apríl 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2013:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og játta 10

mió. kr. av íløgukonto 5775 fyri 2013 til arbeiðið og beina málið í býráðið.

**Býráðið 2. mai 2013:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
**Ráðgevarasáttmálar Ráðgevarasáttmálar**

**31-05-2013** Hevur HMP undirskriva ráðgevarasáttmála fyri bygnings- og EL arbeiðir.

**04-06-2013** hevur pb Consult undirskriva ráðgevara sáttmála fyri ventilatiónsprosjekt.

**21-06-2013** hevur verið licitatión fyri bygnings- og EL arbeiðir.

Innkomin tilboð:

| Felag: | Upphædd | Fyrivarni: |
|---|---|---|
| Articon: | Kr. 13.875.468,00 | ABF 06 |
| TG Verk | Kr. 12.873.516,98 | Tíðarætlan (Sí Skriv) |
| Búsetur | Kr. 8.635.052,01 | ABF 06 |
| Húsavarðatænastan | Kr. 9.624.351,00 | ABF 06 |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka av tilboðnum hjá Búsetur á kr 8.635.052,01.

**Mentamálanevndin 26. juni 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 26. juni 2013:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðið 26. juni 2013:** Einmælt samtykt.

**Mentamálanevndin 20. oktober 2014:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Høllin á Hálsi er bygd í 1970 , hevur verið meginhøllin í býnum í fleiri áratíggju og hýsir alskyns virksemi innan ítrótt, mentan, vinnu v.m. Tørvurin innan økið økist alsamt. og verður mett at ein útbygging av Høllini á Hálsi vil hava fleiri fyrimunir samanlagt í mun til kostnað, nyttuvirði og rakstur.

Tey arbeiði, sum hava verið gjørd við nýggjum umklæðingarrúmum og w.c. á eystursíðuni, nýggjum hallargólvi, taki og endaveggi uppi á tekjuni suðureftir umframt røð av brunaátøkum, eru øll gjørd við støði í prosjektinum hjá BBP arkitektum frá 2007.

Mett verður skilagott, at komandi um- og útbyggingar eisini taka støði í hesum. Tó kann verkætlanin tillagast soleiðis, at ætlað flyting av hallargólvi ikki verður gjørd, tí nyttan í mun til

kostnað er ikki so áhugaverd. Eisini kann útbyggingin suðureftir tillagast ávísum kostnaðarkarmi, meðan útbyggingin norðureftir, sum er tann, ið skal geva fleiri hallartímar, kann vaksa fyri at fáa meira nyttu.

Við at byggja út norðureftir 23m heldur enn bert 18,5m, sum BBP-prosjektið hevur, so er rúm fyri tveimum flogbóltsvøllum, eins og hetta er hálvur hondbóltsvøllur aftrat til venjing. Hetta gevur sostatt fleiri hallartímar aftrat og atknýtt goymsluhøli.

Umframt tann ítróttaliga fyrimunin, so ger henda loysnin, at umstøðurnar verða munandi betri, tá stór tiltøk eru t.d. stevnur, konsertir og møtir. Høllin rúmar tá minst 2.500 fólkum.

Týðandi er, at byggingin órógvar virksemið í høllini sum minst. Tí er eisini fyrimunur, um útbyggingin norðureftir verður framd fyrst, og at ætlanirnar serliga á suðursíðuni verða endurskoðaðar. Prosjektering og støðutakan til útboð av norðurendanum kann verða klárt til januar 2016.

Útbyggingin hevur avleiðingar fyri parkeringsumstøðurnar á Hálsi og í Gundadali. Møguleiki er at útvega 130 nýggj parkeringspláss á lendinum framvið R.C. Effersøesgøtu. Hetta eigur at verða tikið við í hallarverkætlanina.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at fara undir sum fyrsta stig at prosjektera og fáa til vega útbjóðingartilfar av útbygging norðureftir 23m samsvarandi lýsingini omanfyri.

**Mentamálanevndin 6. oktober 2015:** Nevndin samtykti at útvega kostnaðarmeting av hesi loysnini og at arbeitt verður við at staðseta og kostnaðarmeta eina heila høll á Gundadalsleiðini.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur verið í samskifti við Sp/f HMP Consult um eina tillagaða útgávu av BBP-verkætlanini, har tað tó verður hildið fast við verandi byggistíl o.a.

Til ber at realisera eina verkætlan við útbygging norðureftir við einum hálvum vølli, gera vestursíðuna uttan lidna, umframt útbygging suðureftir til judo, borðtennis, móttøkuøkið o.a. fyri 34,9 mio.kr. uttan MVG á 6,25%.

Mett byggitíð er eitt gott ár. Útboð uppá norður og vestursíðuna kann verða um ársskiftið og uppá suðursíðuna í mars. Neyðugt er við smærri tillagingunum í projekteringini av suður-verkætlanini. Til ber eisini at gera parkeringøki við 130 plássum í lendinum millum høllina og R.C. Effersøesgøtu fyri 4,15 mio.kr. umframt kommununar MVG á 6,25%.

Henda útbygging av Høllini á Hálsi og útbyggingin av høllini í Skúlanum á Argjahamri økir um tímatalið, sum til ber at brúka hallirnar til venjing. Sum støðan er í dag, eru 97 tímar at býta til flogbólt og hondbólt. Við at útbyggja á Argjum og á Hálsi verða 166 tímar tilsamans til hondbólt, flogbólt og kurvabólt.

Í Høllini á Hálsi koma í dag lið inn einaferð um tíman. Tá útbygt er, koma lið inn hvønn hálva tíma, tí tey hita upp á hálva vøllinum (útbygdi vøllurin) og fara síðan inn á heila vøllin (verandi vøllur), og tá kann næsta lið koma inn á hálva vøllin til upphiting og venjing. Mett verður, at hetta gevur uml 70% fleiri venjingartíðir, tí skipanin kann ikki nýtast til fulnar til liðini í fremstu deildunum, tí tey vanliga venja 1,5 tíma. Talan er sostatt um munandi meira fleksibla skipan.

Ein annar vinningur er, at tíðin millum dystir gerst styttri, tí størri parturin av upphitingini kann fara fram á hálva vøllinum.

Høllin á Hálsi er eitt slag av tjóðarítróttahøll og fer útbyggingin at styrkja um tann leiklutin innan ítróttin, umframt tað ymiska fjølbroytta mentanar- og handilsvirksemi sum annars er í høllini av og á. Haraftrat er Høllin á Hálsi valstað í býnum o.s.fr.

**Viðv. kostnaðarmeting og staðseting av heilari høll á Gundadalsleiðini**
Ein møguleiki er at byggja eina nýggja høll í økinum suður úr Tórsbreyt. Talan er um matr. 1393a ogn hjá P/F Eik Banka. Ein fult útbygd nýmótans høll ella hallardepil har fer at kosta væl meir enn avsetti kostnaðarkarmurin fyri bygging av ítróttahøllum, ið er tøkur, og sum ætlanin er at játta í 2016. Eisini má væntast, at henda ætlan ber ikki til at realiserað innan stutta tíð.

Hartil skal havast í huga, at í byggiverkætlanini fyri Skúlan á Fløtum er ein ítróttahøll við 400 áskoðaraplásum, sum partur av byggistigi 2, ið verður liðugt á sumri 2019. Haraftrat verður ein ítróttahøll í Marknagilsdeplinum, og er ætlanin at gera avtalu við depilin um at umsita part av hallartíðunum, tá depilin ætlandi er liðugur miðskeiðis í 2017.

Talva við tímum í høllunum er viðfest.
Kostnaðarmeting fyri útbygging av Høllini á Hálsi er viðfest.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla til at
- at heimila umsitingini at fara undir útboð av verkætlanini í sonevndum øvugtum útboði í eini heildararbeiðstøku innan fyri karmin á 34,9 mio.kr.,
- at heimila umsitingini at fara undir útboð av parkingsverkætlanini í einum útboði í heildararbeiðstøku innanfyri karmin á 4,15 mio.kr.
  og at arbeiðið verður fíggjað av karminum til ítróttahallarbygging løgukonta 5775 ítróttaranlegg.

**Mentamálanevndin 09. november 2015:** Útsett til komandi fund.

**Fíggjarnevndin 11. november 2015:** Útsett.

**Ískoyti**

**Útbygging norðureftir av høll í fullari longd, kostnaðarmeting o.a.**
Umsitingin hevur samskift við Sp/f HMP Consult um eina tillagaða útgávu av BBP-verkætlanini í norðurendanum til fevna um eina høll í fullari longd (hondbóltsvøllur), har tað tó verður hildið fast við verandi byggistíl o.a. so vítt til ber, umframt aðrar betranir.

Til ber at realisera eina verkætlan við útbygging norðureftir við einum fullum vølli, gera vestursíðuna uttan lidna (og teimum umvælingum innandura, sum standast av hesum), men ikki útbygging suðureftir til judo, borðtennis, móttøkuøkið o.a. fyri kr. 28,5 mió í handverkaraútreiðslum (HVÚ) u/mvg. Tá er eisini roknað 130 parkeringsplássum í lendinum millum høllina og R.C. Effersøes gøtu. Mett byggitíð er 18 mánaðir. Útboð uppá verkætlanina kann verða í apríl 2016, eftir at neyðug projektering er gjørd. Neyðugt er við ávísum tillagingum í áður gjørdari projektering av norðurverkætlanini.

Kostnaðarmeting og nærri greiningar fyri útbygging av Høllini á Hálsi eru viðfestar, umframt strikutekningar og visualiseringar (visualiseringar verða tøkar mikudagin).

**Nýtsluendamál og hallartímar**
Henda útbygging av Høllini á Hálsi, og útbyggingin av høllini í Skúlanum á Argjahamri økir munandi um tímatalið, sum til ber at brúka hallirnar til venjing. Sum støðan er í dag, eru 97 tímar at býta til flogbólt og hondbólt. Við at útbyggja á Argjum og á Hálsi verða 176 tímar tilsamans til hondbólt, flogbólt og kurvabólt. Verður bygt út við hálvari høll á Hálsi verða tímarnir til hondbólt, flogbólt og kurvabólt 166 tilsamans.

Tað vil siga at tey stóru feløgini(H71, Neistin, Kyndil og Fleyr) kunnu í grundreglum hava hvør sína høll og ÍA og kurvabólt feløgini kunnu deilast um eina høll.

Við heilum vølli afturat á Hálsi kunnu dystir eisini spælast har eins og á Argjahamri.

Um bygt verður sum víst er á tekningunum, verður stórt øki á eystursíðuni, sum kann brúkast til upphiting  bæði til dystir og venjing, sum í dag fer fram í geingjunum, sum er óheppið. Eisini kunnu høllini á eystursíðuni brúkast t.d. til borðtennis o.a. umframt betri goymslumøguleikar.

Tá tiltøk verða í høllini so sum stevnur, møtir, jólasøla og onnur tiltøk sum bert skulu brúka eina høll kann venjast í hinari høllini meðan gjørt verður klárt til tiltøkini, tað vil siga at munandi minni avlýsingar verða hjá feløgunum.

Høllin á Hálsi er eitt slag av tjóðarítróttahøll, og fer útbyggingin at styrkja tann leiklutin. Haraftrat er Høllin á Hálsi valstað í býnum. Høllin kemur at hava pláss fyri umleið 1800 áskoðarum á verandi áskoðaraplássum, umframt tveimum áskoðarapallum, sum kunnu flytast. Hetta fer m.a. geva ítróttafeløgunum møguleika fyri at fáa væl størri inntøkur í sambandi við t.d. finalur í hondbólti og altjóða dystir.

**Judofelagið og borðtennisfelagið**
Judofelagið í Tórshavn hevur 26 íðkandi limir sbrt. yvirlitinum hjá ÍSF frá juni 2015, og í øllum landinum eru 66 íðkandi. Judofelagið venur og hevur kappingar í fimleikahøllini í Eysturskúlanum. Felagið hevur í løtuni 12 tímar um vikuna.
Eitt av teimum feløgunum, ið hevur ynski um betri og støðugari hølisviðurskifti, er Borðtennisfelagið Tór (t.e. borðtennisfelagið í Tórshavnar kommunu). Felagið hevur í løtuni 30 íðkandi sbrt. frágreiðingini hjá ÍSF frá juni 2015, og í øllum landinum eru 68 íðkandi.

Borðtennisfelagið hevur í dag venjingar í høllini í Skúlanum við Løgmannabreyt og í Eysturskúlanum. Borðtennisfelagið Tór hevur 12 hallartímar um vikuna. Felagið hevur stórt ynski um at fáa betri egnað høli til venjing, og at venjingin er á einum stað. Í øðrum tilmæli sæst at tilmælt verður at venjingar teirra verða staðsettar á Látrinum á Argjahamri.

Judofelagið og borðtennisfelagið hava hvør umleið 7 kappingar um árið í Havn. Ein umrøddur møguleiki fyri at skapa hesum ítróttagreinum betri umstøður er at útbygda høllin á Hálsi ognar sær máttur til judo og eini 8 borðtennisborð soleiðis at kappingar framyvir verða í høllini á Hálsi og at Ítróttaanlegg tryggjar at alt er klárt til hesar kappingar í góðum kørmum, meðan judo framyvir venjur í høllini á Argjahamri ella heldur fram í Eysturskúlanum og borðtennisfelagið á Látrinum á Argjahamri.

**Býarskipanar- og myndugleikaviðurskifti**
Høllin á Hálsi er  fevnd av øki D2 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu

seinast broytt 31. oktober 2013. Innan karmar av byggisamtyktini eru rúmir møguleikar fyri bygging í økinum. Í økinum eru ikki nøktandi parkingsviðurskifti og er tí neyðugt innan 2017 at fáa gjørt fleiri parkeringspláss.

**Samlaði kapasiteturin innan ítróttaranlegg og fleirnýtsluendamál**
Hallarkapasiturin í Tórshavnar kommunu er sum heild tepur, og greitt er, at við stóru menningini innan ymiskar ítróttagreinar er tørvur á útbygging av kapasitetinum, og tørvur er á fleiri hallartímum.
Verandi nýtslustig er høgt, samstundis eru Ítróttaranlegg í holt við at fara ígjøgnum og eftirmeta skipanina við atliti at tryggja sær, at optimal nýtsla er av tøka tilfeinginum, t.d. at í fleiri førum er ein heil høll avsett, men bert hálv høll verður brúkt; at tað kemur meir enn so fyri, at ikki verður boðað frá, tá ein høll ikki verður brúkt.

Samanlagt ræður Ítróttaranlegg yvir 16 hallum í kommununi antin alt døgnið ella eftir kl. 16 og í vikuskiftum. Talan er umleið 12.000 $m^2$. av hallum, skiftingarrúmum vm.

Um nevnda útbygging verður framd, verður *økt munandi* um tøku tíðirnar í skipanini til hondbólt, flogbólt, kurvabólt o.a.

**Rakstrarviðurskifti**
Øktir fermetrar í høllini fara at økja rakstrarútreiðslurnar hjá Ítróttaranleggum, men inntøkurnar av hallarleigu skuldu viga upp ímóti øktu útreiðslunum.

Samanumtikið verður mett, at nevnda íløga hevur høgt nyttuvirði og rímiligan kostnað í mun økta kapasitetin og gagnar ítróttinum, frítíðarendamálum og øðrum virksemi, sum er í høllini.

Skjøl eru viðfest.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla til at

- at heimila umsitingini at fara undir útboð av útbygging av høllini og parkeringsøki í sonevndum øvugtum útboði í eini heildararbeiðstøku innan fyri karmin á kr. 28,5 mió HVÚ u/mvg
  og at arbeiðið verður fíggjað av karminum til ítróttahallarbygging løgukonta 5775 ítróttaranlegg.

**Mentamálanevndin 25. november 2015:** Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 02. december 2015:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini við tí ískoyti, at verkætlanin verður víðkað til eisini at umfata hølir til judo og borðtennis, og at beina málið í býráðið.

**Ískoyti**
Sum uppfylging uppá viðgerðina í fíggjarnevndini 2. desember 2015 hevur umsitingin fyrireikað ískoytisverkætlan viðv. hølum serliga ætlað til judo og borðtennis, umframt ta útbygging, ið longu er viðgjørd og samtykt í nevndini.

Mett verður sannlíkt, at til ber at gera ein kjallara á uml. 400 m2 undir norðurskjøldrinum í útbygdu dupulthøllini fyri umleið 6,4 mio.kr. Kjallarin kann hýsa judo og borðtennis. Harumframt kann verða talan um onnur endamál, alt eftir nær og hvussu nógv hølini verða

brúkt til høvuðsendamálini. Málið er, at judomáttur til ein vøll liggja frammi, uttan so at onkur heilt serligt orsøk ger seg galdandi. Á henda hátt fær judo fastar karmar kring virksemið. Viðv. borðtennis verður møguleiki fyri, at fleiri borð kunnu standa fast frammi, og fær borðtennis soleiðis støðugar og framúr karmar. Ætlandi skal virksemið hjá hesum ítróttagreinunum kunna samvirka í ávísan mun. Sp/f HMP hevur projekterað verkætlanina á Hálsi higartil.

Nærri tekningar og útgreinað kostnaðmeting verður tøk mánadagin.

**Tilmæli**
Tekniski stjórin, trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at heimila umsitingini at fara undir samráðingar við Sp/f HMP Consult við atliti til at liðugprojektera hallarútbyggingina, sum áður samtykt 25. november 2015, umframt við hesum ískoyti viðv. útbygging í kjallaranum og venda aftur til mentamálanevndina og fíggjarnevndina við einum samráðingarúrsliti primo januar 2016.

**Mentamálanevndin 07. december 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 09. december 2015:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 10. desember 2015:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur verið í samráðingum við Sp/f HMP-consult og er nú sáttmáli klárur um projektering. Sí hjálagt sáttmálauppskot, ið lýsir viðurskiftini nærri.

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin, trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at staðfesta sáttmálauppskotið og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 13. januar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. januar 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. januar 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Ráðgevin Sp/f HMP Consult hevur gjørt klárt projektuppskot til byggiverkætlanina íroknað anleggsarbeiði viðv. parkeringsøkinum. Verkætlanarbólkur fyri útbygging av høllini á Hálsi hevur verið við í tilgongdini og mælir til at góðkenna hjálagda projektuppskot. Sí hjáløgdu skjøl.

Í mun til áður gjørdar metingar er talan um ávísan mun á metta kostnaðinum, men verður mett at talan er um innanfyri ta óvissu, ið vil verða í sambandi við slíkar metingar og sum

endaligu arbeiðstøkurnar vilja staðfesta nærri. Fyri at koma til nevndu kostnaðarmeting eru gjørdar ein røð av tillagingum, ið tó ikki broyta grundleggjandi uppá verkætlanina.

Við støði í projektuppskotinum fer ráðgevin beinanvegin undir at detailprojektera verkætlanina. Ætlandi verður detailprojekteringin fyri jørðarbeiðið klár um stutta tíð, soleiðis at jørðarbeiðið longu verður klárt at bjóða út innan 2-3 vikur. Ætlanin er at tilboð uppá jørðarbeiðið eru innkomin og klár til nevndarviðgerð 6. apríl 2016.

**Tilmæli**

Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja hjálagda projektuppskot.

**Mentamálanevndin 02. marts 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**

Útbyggingin av høllini á Hálsi og nýtt parkeringsøki móti R.C. Effersøesgøtu, er sum áður ætlað at bjóðað út í tveimum. Fyrst jørðarbeiði íroknað parkeringsøki og síðani bygningsarbeiði. Bygningsarbeiðið verður væntandi bjóðaði út um mánaðarskifti maj/juni.

Útboð hevur verið av jørðarbeiðinum í sambandi við verkætlanina. Týsdagin tann 5. apríl kl. 11:00 var lisitatión hildin. Fýra arbeiðstakarar vóru bidnir um at bjóða, og allir lótu tilboð inn.

Tilboðini vóru soljóðandi:

| | |
|---|---|
| P/F Articon | kr. 10.648.010,00 |
| P/F J&K Contractors | kr. 9.067.613,00 |
| Sp/f Plan | kr. 10.167.628,70 |
| Sp/f TG Verk | kr. 11.248.229,00 |
| | |
| Metingin segði | kr. 7.950.000,00 |

Ikki íroknað MVG.

Við í arbeiðinum varð bjóðað út gravir vm. til fjarhitaleiðing. Ynski um fjarhita er komið inn seinni í verkætlanina, sum ein meirkostnaður.

Parturin í innkomna tilboðnum til jørðarbeiði, sum knýtir seg til fjarhitaskipan, er kr. 391.012,00.

Hvussu stórur partur fjarhitakostnaðinum verkætlanin skal rinda og hvussu stórur partur Fjarhitafelagið skal rinda, er ikki avgreitt enn, men er til samráðingar.

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla til at farast kann undir samráðingar um sáttmála um jørðaarbeiðið til útbygging av høllini á Hálsi og tilhoyrandi parkeringsøki við lægsta tilboðsveitara, ið er P/F J&K Petersen Contractors, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 06. april 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Helena Dam á Neystabø var ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Ískoyti:**
Víst verður til tilmælið og samtyktina omanfyri. Av misgáum er ikki biðið um heimild at gera sáttmála, tá samráðing er liðug at leggja fyri fíggjarnevninda. Sáttmáli væntast klárur til fíggjarnevndarfundin, og tí verður biðið um heimild til eisini at gera sáttmála.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og tekniski stjórin mæla til at, at farast kann undir samráðingar og at gera sáttmála um jørarbeiðið við lægsta tilboðsveitara at leggja fyri fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. april 2016:** Samtykt at gera sáttmála við P/f J&K Contractors og at játta kr. 9.101.547 umframt mvg. av framfluttum løgukarmi, 5775, til L 57003, høllin á Hálsi, og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. apríl 2016:** Einmælt samtykt.

## 108/16 Eykajáttan í sambandi við at at Tórshavnar kommuna verður 150 ár í 2016

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 15.03.2016 | 117/16 | 16/01304-1 |
| 2 Býráðsfundur | 17.03.2016 | 93/16 | 16/01304-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 17.03.2016 | 118/16 | 16/01304-1 |
| 4 Býráðsfundur | 19.04.2016 | 108/16 | 16/01304-1 |

**Málslýsing:**
Í sambandi við, at Tórshavnar kommuna verður 150 ár 2016 og ætlanin er at skipa fyri ymiskum tiltøkum í døgunum 26. mai til 29. mai 2016. Eisini er ætlanin, at skipa fyri tiltøkum, tá onnur tiltøk eru í býnum ígjøgnum árið t.d. Mentanarnátt, ólavsøka, M.A. Jacobsen og ymiskt fyri børn og eldri á stovnum. Ætlanin er eisini, at gera eina framsýning og ein film um Havnar søgu. Tað verður hervið biðið um eykajáttan á kr. 550.000,00 til útreiðslur.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og fyrisitingarstjórin mæla til at játta av konto 20910 á konto 5310, mentanartiltøk og annað, 550.000 kr. til útreiðslur í sambandi við at Tórshavnar kommuna verður 150 ár.

**Fíggjarnevndin 15. mars 2016 umvegis teldupost:** Einmælt samtykt.

**Fíggjarnevndin 17. marts 2016:** Staðfest at játta kr. 550.000 sum eykajáttan av konto 20910 á konto 5310, mentanartiltøk og annað, og málið beint í býráðið at viðgera tvær ferðir.

**Býráðsfundur 17. mars 2016:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 19. apríl 2016:** Einmælt samtykt.

## 109/16 Sjálvsognarstovnurin "Íbúðir til ung undir útbúgving": Umsókn um heimild at taka lán

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 01.05.2014 | 91/14 | 14/02777-2 |
| 2 Býráðsfundur | 22.05.2014 | 122/14 | 14/02777-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 28.09.2015 | 194/15 | 14/02777-2 |
| 4 Fíggjarnevndin | 13.04.2016 | 130/16 | 14/02777-2 |
| 5 Býráðsfundur | 19.04.2016 | 109/16 | 14/02777-2 |

### Málslýsing:

Í skrivi, dagfest 23. apríl 2014, heitir nevndin í sjálvsognarstovninum "Íbúðir til ung undir útbúgving" á Tórshavnar Býráð um at fáa heimild at taka upp lán til at fremja neyðugar ábøtur á Næmingaheimið undir Fjalli. Í skrivinum stendur m.a.: "Tað er umráðandi at nýta hetta summarið til at skifta vindeyguni. Mett verður ikki, at tað er forsvarligt at fara undir enn ein vetur við gomlum og sera vánaligum vindeygum. Næmingabústaðirnir eru í ov vánaligum standi til endamálið". Víst verður á, at tað er alneyðugt at gera arbeiðið í summar, og neyðugt er at bíleggja vindeyguni nú, tí bíleggingartíð er.

Sambært grein 6 í viðtøkunum fyri "Íbúðir til ung undir útbúgving" krevja lántøka, veðhaldsveitan og onnur skuldbinding og keyp og søla av føstum ognum samtykt frá Tórshavnar Býráð.

Nevndin fyri Næmingaheimið vendi sær í 2010 til Tórshavnar Býráð við fyrispurningi um at taka neyðugt lán til umvælingar, og víst verður til eina frágreiðing, ið gjørd varð í tí sambandi, har niðurstøðan var, at tað var neyðugt at skifta vindeyguni í báðum bygningunum eins og at skifta tekjurnar, umframt at mett varð neyðugt at skifta køkarnar, ið ikki eru endurnýggjaðir, síðan húsini vórðu bygd.

Tilboð eru nú fingin at skifta vindeygu og at leggja nýggja tekju á. Nevndin hevur samtykt at taka av tilboðum, sum eru kr. 812.000 fyri nýggju vindeyguni og kr. 556.000 fyri arbeiðið at skifta tekjurnar. Samlaði kostnaðurin av at umvæla tekju og vindeygu er sostatt kr. 1.368.000, og søkt verður um heimild at taka lán upp til kr. 1.500.000.

Sambært roknskapi hjá Næmingaheiminum er innistandandi pr. 01.04.2014: 380.000 kr.

### Tilmæli:

Kommunustjórin og fyrisitingarstjórin mæla til at heimila lántøku.

**Fíggjarnevnd 01. maj 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundir 22. mai 2014:** Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Nevndin í Næmingaheiminum undir fjalli heitir í skrivi dagfest 8. mai 2015 á Tórshavnar kommunu og Mentamálaráðið um at fara undir samráðingar um, at Bústaðir yvirtekur ´Næmingaheimið Undir Fjalli´ soleiðis, at Næmingaheimið kemur í eina trygga legu. Skrivið er hjálagt.
Sum nevndin hevur víst á áður, er tørvur á stórum, átrokandi og kostnaðarmiklum umvælingum. Nevndin sigur, at tað ber ikki til at fíggja hesar umvælingar innanfyri tær inntøkur, ið koma inn sum leiguinntøka. Metti kostnaðurin av at skifta tak og uppsetan av nýggjum køkum er uml. kr. 1 mió. Grannskoðarin hjá stovninum metir ikki, at inntøkurnar frá leigu megna at fíggja eina so stóra lántøku, og nevndin metir ikki, at tað er ráðiligt at hækka leigukostnaðin.
Sambært § 6 í viðtøkunum fyri Næmingaheimið undir Fjalli, krevst samtykki frá Tórshavnar kommunu, um sjálvsognarstovnurin skal avhendast øðrum.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin av løgdeildini mæla fíggjarnevndini at lata umsitingina fara undir eina samráðingartilgongd við Næmingaheimið, Mentamálaráðið og Bústaðir um eina møguliga avhending av heiminum til Bústaðir. Treytað av, at ognin framyvir tænir sum næmingaheim.

**Fíggjarnevnd 28. september 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**:
Fundir hava verið við Nevndina fyri Næmingaheimið, Mentamálaráðið og Bústaðir, ið er sinnað at yvirtaka "Næmingheimið undir Fjalli" fyri "null" krónir.

Áognin hjá MMR er 8.437.434 kr. ið MMR er sinnað at strikað treytað av, at ognin framvegis verður brúkt til endamálið og ikki verður seld, vísand til §7 stk. 2 í lóg nr. 63 frá 1983.

Sambært roknskapinum, er áognin hjá kommununi 2 mió. kr., ið er innskot kommununar. Upphæddin er ikki tinglisin.

Í viðtøkunum er ásett í §13 stk. 2, at verður stovnurin tikin av, so fellur møgulig nettoáogn, tá partur landskassans er goldin, til kommununa, ið skal nýta hesa til íbúðarfremjandi endamál.

Við at lata Bústaðir ognina fyri null krónur verður møgulig áogn brúkt til íbúðarfremjandi endamál, sum ásett í viðtøkunum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á løgdeildini mæla til at :
1. Góðkenna, at sjálvsognarstovnurini "íbúðir til ung undir útbúgving" verður tikin av.
2. Bústaðir yvirtekur ogninar fyri "null" kr. treyta av, at landi ger tað sama og treytað av, at ognin framhaldandi verður brúkt til endamálið og ikki verður seld.

**Fíggjarnevndin 13. april 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. apríl 2016:** Einmælt samtykt.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>19. apríl 2016 | Blað nr.: 13011<br><br>Formansins merki: |

# 110/16 Umsókn frá Articon um víðkan av leiguøki á havnarlagnum á Sundi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 04.04.2016 | 14/16 | 16/01227-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 13.04.2016 | 138/16 | 16/01227-2 |
| 3 Býráðsfundur | 19.04.2016 | 110/16 | 16/01227-2 |

**Málslýsing:**
Økið á Sundi er deilt upp í tvey. Økið niðan fyri vegin, tað sum liggur oman móti bryggjuni, og økið oman fyri vegin, har sum asfaltverkið liggur.
Tá havnalagið á Sundi bleiv tikið í brúk, bleiv tað í byggisamtyktini ásett, at alt økið skuldi brúkast til *vinnu, ið beinleiðis ella óbeinleiðis eru útflutningsfremjandi og til virksemi, ið hava samband við hesar vinnur.*
Seinni er byggisamtyktin broytt, soleiðis at økið oman fyri vegin hevur tað somu ásetingina sum frá byrjan, meðan økið niðan fyri vegin hevur fingið eina aðra áseting,sum ljóðar soleiðis:
*Umráðisparturin verður sum heild lagdur til endamál, ið hava beinleiðis við havnarakstur at gera, fyrst og fremst skrivstovur og goymslur í samband við skipaferðslu og vøruflutning og tílíkt og til virksemi, ið hava samband við hesi t.e. tænastuvirksemi og bilstøðlar o.t.*

Líka síðani byrjan hevur sjálv bryggjan verið brúkt til bulkvørur, t.e. sandur, skervur og skrott, umframt at onnur skip, sum hava umlastað, hava brúkt bryggjuna.

Tann 30. oktober 2014 samtykti býráðið at gera ein 25 ára leigusáttmála við P/F Articon um at leiga 10.000 $m^2$ av økinum
Umframt at brúka økið til móttøku og goymslu av sandi og skervi, sum verður innflutt um bryggjuna á Sundi, hevur Articon bygt ein bygning á økið, sum verður brúktur til goymslu av sementi í stórum sekkjum.

Í skrivi frá Articon, dagfestur 3. mars 2016, verður søkt um at víðka økið eystureftir við 2.000 $m^2$.
Í umsóknini verður sagt, at virksemið er nógv økt, og tí er ætlanin at byggja 2 siloir á økinum til sement í bulk, soleiðis at lønsemið í framleiðsluni gerst betri.

**Viðmerkingar frá umsitingini:** Um avgjørt verður at leiga Articon 2.000 $m^2$ afturat teimum 10.000 $m^2$ sum teir hava leigað síðan 2014, eru tað 3.000 $m^2$ eftir av tøkum økið í eystara enda.

**Tilmæli:**
Havnameistarin mælir til at ganga umsóknini á møti, og at gera eitt ískoyti til verðandi leigusáttmála, sum er dagfestur 6. november 2014, at leigumálið verður víðkað við 2.000 $m^2$ eystureftir.

**Vinnunevndin 04. apríl 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 13. april 2016:** Samtykt at taka undir við vinnunevndini og beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 19. apríl 2016:** Einmælt samtykt.

# 111/16 Umsókn um at broyta byggisamtyktina fyri matr. nr. 238a, 238b, 239 og 236, Kollafjørður

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 01.04.2016 | 100/16 | 16/01324-2 |
| 2 Býráðsfundur | 19.04.2016 | 111/16 | 16/01324-2 |

**Málslýsing:**
Faroe Law søkja vegna Sp/f Sitkon og Sp/f IR Lastbilar, um broyting av byggisamtyktini fyri matr. nr. 238a, 238b, 239 og 236, Kollafjørður, broytt frá B2-havnaøki til B3-vinnuøki.

Upplýst verður í skrivinum, at ognirnar 238a, 238b, 239, Kollafjørð, í dag verður brúkt til parkeringspláss og goymsluhøll hjá Sp/f IR Lastbilum. Ognin matr. nr. 236, sum fyrr hevur verið timburhandil, seinnu árini hevur verið útleigaður til ymiskar handilsfyritøkur.

Í skrivinum verður víst á, at eftir at Kollafjarðar og Tórshavnar kommuna vóru lagdar saman, var byggisamtyktin fyri Kollafjørð broytt soleiðis, at omanfyri nevndu ognir komu at liggja í B2-havnaøki. Sagt verður eisini, at tað ongantíð hevur verið virksemi í tráð við galdandi byggisamtykt á hesum ognunum.

Til hetta kann sigast, at áðrenn byggisamtyktin fyri Kollafjørð var broytt, var sama økið sum nú er B2-havnaøki, við m.ø. omanfyri nevndu ognum, D-havnaøki í byggisamtyktini fyri Kollafjørð, við nærum somu ásetingum sum B2-havnaøki.

Sambært Tórshavnar havn eru ongar ætlanir um havnavirksemi á hesum økinum. Tí skuldi tað ikki verið nakað í vegin fyri at gingið umsóknini á møti og broytt byggisamtyktina fyri ognirnar matr. nr. 238a, 238b, 239 og 236, Kollafjørður, frá B2-havnaøki til B3-vinnuøki.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at ganga umsóknini á møti og broyta byggisamtyktina fyri ognirnar matr. nr. 238a, 238b, 239 og 236, Kollafjørður, frá B2-havnaøki til B3-vinnuøk samsvarandi korti, dagfest 21. mars 2016 og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 01. apríl 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 19. apríl 2016:** Einmælt samtykt.

# 112/16 Uppskot til broyting av byggisamtyktini fyri Kollafjørð - partur av D1-økinum við Sjógv verður broytt til C2-øki

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 01.04.2016 | 101/16 | 16/01190-2 |
| 2 Býráðsfundur | 19.04.2016 | 112/16 | 16/01190-2 |

**Málslýsing:**
Umsókn frá eigarunum av matr. nr. 151a og 151b við Sjógv í Kollafirði, um broyting av byggisamtyktini soleiðis, at tann parturin av ognunum, sum liggur í D1-øki, verður broytt til C2-øki.

Ognirnar matr. nr. 151a og 151b eru millum 1.200 og 1.300 m til støddar og ætlanin er at marknaumskipa økið soleiðis, at matr. nr. 151a, við ástandandi sethúsum, verður uml. 616 $m^2$ og matr. nr. 151b, við ástandandi vinnubygningi, verður knappar 1.900 $m^2$.

Fram við vegnum við Sjógv, vestan fyri handilin Carl August Jensen, eru fleiri ognir, sum lutvíst eru C3-øki og lutvíst D1-øki, og í sambandi við uppskotið til broyting av byggisamtyktini fyri matr. nr. 151a og 151b, verður hugt eftir økinum sum heild.

Tær báðar vestastu ognirnar, matr. nr. 153 og 152, hava mark oman ímóti Botná og frástøðan frá ánni til C2-byggiøki er millum 8 og 15 m. Fram við Botnavegnum er hildin ein frástøða frá byggiøkinum til ánna. Hetta fyri at halda økið fram við ánni frítt fyri bygging. Tí mælir umsitingin frá, at byggisamtyktin fyri ognirnar matr. nr. 153 og 152 verður broytt.

Fyri ognirnar sum søkt er um at broyta, matr. nr. 151a og 151b, og ognin beint eystanfyri, matr. nr. 145a, gamli skúlin í Kollafirði, mælir umsitingin til at broyta byggisamtyktina.

Eystastu ognirnar í hesum økinum, eru matr. nr. 107r, har stórur partur liggur innanfyri byggilinjuna fyri landsvegin, verður ikki mælt til at broyta, matr. nr. 149a, har ein lítil partur, uml. 90 $m^2$, liggur í D1-øki og matr. nr. 107h er uml. 155 $m^2$ í D1-øki, hetta verður mælt til at broyta.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at, byggisamtyktin fyri Kollafjørð verður broytt fyri partar av ognunum matr. nr. 107h, 149a, 145a, 151a og 152b sambært korti, dagfest 15.03.2016 og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 01. apríl 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 19. apríl 2016:** Einmælt samtykt.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>19. apríl 2016 | Blað nr.: 13015 |
| | Formansins merki: |

## 113/16 Áheitan á kommununa um at strika servituttin á ognini matr. nr. 1041a, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 13.04.2016 | 143/16 | 16/01221-3 |
| 2 Býráðsfundur | 19.04.2016 | 113/16 | 16/01221-3 |

**Málslýsing:** Anfinn V. Hansen hevur í skrivi heitt á kommununa um at strika servituttin um helvtargjald á ognini matr. nr. 1041a. Servitutturin varð lagdur á ognina í 1966, tá ið kommunan seldi trøðna til táverandi leigaran, sum upprunaliga hevði leigað trøðna frá Færø Amt, og sum sostatt var leigari, tá ið kommunan yvirtók Álagerðisfestið í 1932.

Hægstirættur segði 20. november 2015 dóm í máli, ið snýr seg um líknandi viðurskifti sum í fyriliggjandi máli. Hægstirættur staðfesti, at kommunan hevur ikki havt rætt til at leggja servitutt á traðirnar í sambandi við sølu til teir persónar, sum høvdu leigað traðirnar, áðrenn kommunan yvirtók Álagerðisfestið.

Av tí at talan er um meinlík mál, hevur kommunan – vísandi til Hægstarættardómin - ikki heimild at halda fast um, at servituttur skal vera á ognini 1041a, Tórshavn, og tí verður mælt til at strika servituttin samsvarandi áheitanini frá Anfinni V. Hansen.

**Tilmæli:** Leiðarin á Løgdeildini og kommunustjórin mæla býráðnum til umvegis fíggjarnevndina at strika servituttin um helvtargjald á ognini matr. nr. 1041a, Tórshavn, í grein 2, síðsta pkt. í ognarbrævinum millum Tórshavnar kommunu og Oluf Hansen, dagfest 3. november 1966 og undirskrivað 4. november 1966.

**Fíggjarnevndin 13. april 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. apríl 2016:** Einmælt samtykt.

# 114/16 Lendisgøtur 2014

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 13.03.2014 | 49/14 | 14/01470-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.03.2014 | 76/14 | 14/01470-1 |
| 3 Býráðsfundur | 27.03.2014 | 64/14 | 14/01470-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 01.04.2016 | 104/16 | 14/01470-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 13.04.2016 | 142/16 | 14/01470-1 |
| 6 Býráðsfundur | 19.04.2016 | 114/16 | 14/01470-1 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Vísandi til mál um lendisgøtur mál nr. 14/00983, um skipanarætlan og framløgu á fundi tann 6. november 2013, at raðfesta tilgongdina og eyðmerkja 1.000.000 kr av íløgum 2014 soleiðis:

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Liðugtgerð av Oyggjargøtuni | 400.000 kr |
| 2. | Kollafjørður, Frammi í Dal | 88.000 kr |
| 3. | Havnardalur, Velbastaðvegur til Vatnverkið framvið Sandá | 60.000 kr |
| 4. | Havnardalur framvið ánni Bráanshelli-Kleynsvarða | 410.000 kr |
| 5. | Annað | 42.000 kr |
| Tilsamans | | 1.000.000 kr |

Fíggjarlig viðurskifti: Í íløguætlanini fyri 2014 eru avsettar til lendisgøtur 1.mill.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býargartnarin mæla til at samtykkja omanfyri standandi, og at málið verður beint í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 13. mars 2014:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Helena D. á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.
**Fíggjarnevnd 19. mars 2014:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 27. mars 2014:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Framhald av lendisgøtugerð í 2016, ið fevnir um:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | Liðugtgerð av gøtum við Oyggjarvegin 270 m | kr. | 135.000 |
| 2. | Frá Kirkjubøarveg-út í Havnardal 200 m | kr. | 100.000 |
| 3. | Frá FRF til FÍR 200 m | kr. | 100.000 |
| 4. | Viðlíkahald av gøtuni oman fyri Gráastein | kr. | 150.000 |
| 5. | Liðugtgerð av gøtu viðarlundin Havnardalur | kr. | 200.000 |
| 6. | Gerð av omankoming til Kirkjubøar | kr. | 100.000 |
| 7. | Frá Gráasteini til rossagøtuna | kr. | 100.000 |
| 8. | Annað ókent at taka til | kr. | 47.475 |
| 9. | Meirnýtsla í 2015 | kr. | 33.525 |

Tøkt tilsamans kr. 966.475

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja omanfyri standandi og at málið verður beint í býráðið um fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 01. apríl 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Á íløguætlanini fyri 2016 eru settar 1 mió. kr. av til lendisgøtur.

**Tilmæli:**
Miðfyrisitingarstjórin og leiðarin á fíggjardeildini mæla til, at játtað verður 1 mió. kr. av konto 6275 Fríðkan av kommununi.

**Fíggjarnevndin 13. april 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. apríl 2016:** Einmælt samtykt.

# 115/16 Umsókn um yvirtøku av vegnum Grønalíð, matr. nr. 1184 og 886d, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 06.04.2016 | 38/16 | 15/04159-4 |
| 2 Fíggjarnevndin | 13.04.2016 | 139/16 | 15/04159-4 |
| 3 Býráðsfundur | 19.04.2016 | 115/16 | 15/04159-4 |

**Málslýsing:**
Umboð fyri borgarar við Grønulíð hevur vent sær til Tórshavnar kommunu við áheitan um, at kommunan yvirtekur privata vegøkið Grønalíð, matr. nr. 1184 og 886d, Tórshavn ( sí j. nr. 15/04159-1 og 15/04159-3)

Umsiting kommununnar hevur støðulýst vegøkið (j. nr. 15/04159-2)

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at boðað verður umsøkjaranum frá, at kommunan er sinnað at yvirtaka vegøkið, ið er fevnt av nevndu matriklum, íroknað vegin Hvarvið, sum er partur av matr. nr. 886d, Tórshavn, uttan kostnað fyri kommununa, tá umsøkjararnir hava fingið til vega tilfar og undirskriftir, ið eru neyðugar fyri at tinglesa ánaraskifti. At tilsøgnin er galdandi í 1 ár og at málið verður beint í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 06. apríl 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Helena D. á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 13. april 2016:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 19. apríl 2016:** Einmælt samtykt.

# 116/16 Undirskriftir frá íbúgvum í Traðabrekku um trupul atkomuviðurskifti, at eystari endin á vegnum verður bundin í Hoyvíksvegin

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Ferðslunevndin | 14.01.2016 | 10/16 | 15/04352-4 |
| 2 Tekniska nevnd | 13.01.2016 | 9/16 | 15/04352-4 |
| 3 Fíggjarnevndin | 20.01.2016 | 12/16 | 15/04352-4 |
| 4 Tekniska nevnd | 10.02.2016 | 13/16 | 15/04352-4 |
| 5 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 77/16 | 15/04352-4 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 04.03.2016 | 69/16 | 15/04352-4 |
| 7 Fíggjarnevndin | 09.03.2016 | 112/16 | 15/04352-4 |
| 8 Ferðslunevndin | 23.03.2016 | 29/16 | 15/04352-4 |
| 9 Tekniska nevnd | 06.04.2016 | 42/16 | 15/04352-4 |
| 10 Fíggjarnevndin | 13.04.2016 | 140/16 | 15/04352-4 |
| 11 Býráðsfundur | 19.04.2016 | 116/16 | 15/04352-4 |

**Málslýsing:**
Íbúgvar í Traðabrekku vísa á truplu atkomuviðurskiftini, tí brekkan til økið er so brøtt, serliga um veturin, tá kavi og hálka er. Tí vísa teir á møguleikan at binda eystara enda av Traðabrekku í Hoyvíksvegin. Økið millum Traðabrekku og Hoyvíksvegin, matr. nr. 726c, er ogn hjá Tórshavnar kommunu.

Tekniska nevnd skal taka støðu til um farast skal undir fyrireikandi arbeiði at gera vegakomu á matr.nr. 726c, Tórshavn og sostatt knýta Traðabrekku í Hoyvíksvegin.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Tað fyriliggur eingin ítøkilig fíggjarlig meting av arbeiðinum at gera vegatkomuna, men væntast kann at kostnaðurin verður uml. 1 mió. kr.

Spurningurin um ferðsluviðurskifti á vegamótinum við Hoyvíksvegin/Stoffalágvegin er ikki viðgjørdur enn.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at knýta Traðabrekku í Hoyvíksvegin og at farast skal undir planleggingararbeiðið at leggja fyri nevndina. Mælt verður eisini til at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið við atliti til fígging av kto. 8175 aðrar vegaætlanir 2016.

**Tekniska nevnd 13. januar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ferðslunevndin 14. januar 2016:** Umsitingin arbeiðir víðari við málinum. Ferðsluteljingar verða gjørdar.

**Fíggjarnevndin 20. januar 2016:** Málið beint aftur í teknisku nevnd vegna ógreið viðurskifti viðvíkjandi ognini 726c og áður samtyktum ætlanum við økinum.

**Ískoyti:**

Málið um matr. nr. 726c, Tórshavn, tók sín uppruna í 2002, tá ið kommunan keypti ognina við tí endamáli at fáa vegasamband millum Traðabrekku og Hoyvíksvegin. Víst verður í hesum sambandi til mál nr. 14/03899, har tað framgongur, at málið um vegatkomu í byggi- og býarskipanarnevndini 10. oktober 2014 var broytt til at fevna um gøtusamband og p-pláss umframt eitt stykki til at selja. Fíggjarnevndin hevur síðani tikið undir við byggi- og býarskipanarnevndini, har stykki til møguliga sølu verður uml. 500 fermetrar til víddar og at írestandi økið út móti Hoyvíksvegnum verður lagt út til alment parkeringsøki.

Víst verður harumframt til mál nr. 14/0385, 2010-1738 og 2010-1513, har borgarar hava sýnt ognini áhuga.

Málið er sostatt ongantíð komið til teknisku nevnd.

**Tekniska nevnd 10. februar 2016:** Nevndin staðfestir samtyktina frá 13. januar 2016 og beinir málið í byggi- og býarskipanarnevndina og fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Samtykt at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Víst verður til hesi mál:
1) mál nr. 2002-1884, Tórshavnar kommuna hevur keypt matr.nr. 726c, Hoyvíksvegur 41a. Húsini eru millum Hoyvíksvegin og Traðabrekku, við tí endamáli, at taka húsini niður og føra Traðabrekku út í Hoyvíksvegin.
2) Mál nr. 14/03899, Fíggjarnevndin hevur samtykt at skipa økið sambært tekning, við gøtusambandi millum Hoyvíksvegin og Traðabrekku, einum sethúsagrundøki á uml. 500 $m^2$ og alment parkeringsøki.

Vísandi til mál nr. 14/03899, har býarskipanardeildin hevði eina søguliga gjøgnumgongd av málinum og vísti á, at Tórshavnar kommunnu í 2004 keypti ognina matr. nr. 726c, Hoyvíksvegur 41a, við tí endamáli, at taka húsini niður, og føra Traðabrekku út í Hoyvíksvegin. Mælt var til, at beina málið í teknisku nevnd og ferðslunevndina til støðutakan um vegagerð yvir matr. nr. 726c frá Traðabrekku til Hoyvíksvegin.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at taka undir við teknisku nevnd at fyrireika vegagerð yvir matr. nr. 726c og um pláss er fyri tí, at leggja øki av til eitt sethúsagrundøki.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 04. mars 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 09. marts 2016:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarevndini.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Ferðsluteljingar eru gjørdar við vegamótið Hoyvíksvegur/Stoffalág. Teljingin var frá 02.03 – 09.03. 2016. Tá koyrt verður frá býnum, eru tølini: 3963 áðrenn snarað verður inn á Stoffalágvegin, og 3119 eftir vegamótið. Tølini eru ársdøgnmiðalferðsla.

**Ferðslunevndin 23. mars 2016:** Nú ferðsluteljingar eru gjørdar, metir nevndin, at einki er til hindurs fyri at gera eina íbinding.

**Tilmæli:**

Í framhaldi av tilmælinum til teknisku nevnd 13. januar 2016 og tilmælinum til byggi- og býarskipanarnevndina 4. mars 2016, mælir byarverkfrøðingurin til at játta kr. 300.000,- av íløgum fyri vegaætlanir 2016, konto 8175, til at fyrireika vegagerð yvir matr. nr. 726c og um pláss er fyri tí, at leggja øki av til eitt sethúsagrundøki og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 06. apríl 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Helena D. á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 13. april 2016:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. apríl 2016:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrun Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen, Sjúrður Olsen, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

Greiddi ikki atkvøðu:
Jógvan Arge.

# 117/16 Umsókn um yvirtøku av privatum vegi ovara part av Perskonugøtu.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 06.04.2016 | 40/16 | 16/00394-3 |
| 2 Fíggjarnevndin | 13.04.2016 | 141/16 | 16/00394-3 |
| 3 Býráðsfundur | 19.04.2016 | 117/16 | 16/00394-3 |

**Málslýsing:**
Ánararnir av vegnum ovast í Perskonugøtu, hava søkt um at kommunan yvirtekur vegøkið, sum er partur av matr. nr. 912a, Tórshavn, ið er óbygd trøð umleið 12.447 fermetrar til víddar.

Umsøkjararnir vísa til, at teir hava havt ætlanir um at gera eina útstykking í Perskonugøtu, men hetta hevur verið darvað av tí privata vegnum og tí standi hann er í, og hugsa sær eina tilgongd, har vegurin verður yvirtikin og samstundis verður ein ætlan gjørd fyri vegin, soleiðis at útstykkingarætlanin kann førast út í lívið.

Umsiting kommununnar hevur støðulýst vegøkið og kostnaðarmett møguligar ábøtur (j. nr. 16/00394-2).

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til, at boðað verður umsøkjarunum frá, at Tórshavnar kommuna er sinnað at yvirtaka vegøkið í 8 m breidd, uttan kostnað fyri kommununa og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 06. apríl 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Helena D. á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 13. april 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. apríl 2016:** Einmælt samtykt.

# 118/16 Arbeiði at dagføra kloakkir í Tórshavnar kommmunu sambært góðkendari spillivatnsætlan til 2015

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Kaldbaksnevndin | 26.02.2014 | 7/14 | 14/01352-11 |
| 2 Tekniska nevnd | 13.01.2016 | 2/16 | 14/01352-11 |
| 3 Fíggjarnevndin | 20.01.2016 | 19/16 | 14/01352-11 |
| 4 Býráðsfundur | 28.01.2016 | 31/16 | 14/01352-11 |
| 5 Tekniska nevnd | 06.04.2016 | 36/16 | 14/01352-11 |
| 6 Fíggjarnevndin | 13.04.2016 | 144/16 | 14/01352-11 |
| 7 Býráðsfundur | 19.04.2016 | 118/16 | 14/01352-11 |

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Tórshavnar kommuna skal innan 2015 gera ávís kloakkarbeiði, so at kloakkirnar lúka minstukrøvini, ið eru ásett í spillivatnsætlanini sambært kungerð nr. 111 frá 7. september 2009, sum býráðið 1. november 2012 hevur samtykt (sí mál nr. 2010-2190).

Ætlanin fevnir sum kunnugt um:
1. Lýsing av spillivatnsskipanini, íroknað bygnað, tilfar, aldur, reinsing og kloakkeringsøkið
2. Slag og nøgd av spillivatni, ið verður og fer at verða leitt gjøgnum leiðingarnar
3. Útleiðingarstøð og umhvørvi rundanum, t.d. botn- og vatngóðsku og streymviðurskifti
4. Ampar og umhvørvisárin frá skipanini og útleiðingini
5. Eftirlit og røkt av spillivatnsskipanini
6. Meting um væntaða menning í kommununi hvat fólkatali og ídnaðartilgongd viðvíkur, og hvønn týdning menningin hevur fyri samansetingina og nøgdina av spillivatni, og fyri umhvørvið, ið spillivatnið verður leitt út í
7. Grundgivna raðfesting av nær ætlaða kloakkeringsarbeiðið verður framt, og nær tað væntandi verður liðugt.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Grundað á fyribils metingar hevur umsitingin mælt til at raðfesta arbeiðini í nevndu spillivatnsætlan soleiðis, at játtanin var í hesi raðfylgju í 2012: 7,5 mió., í 2013: 7,5 mió. og í 2014: 4,1 mió.

Spillivatnsætlanin fevnir um dagføring av kloakkum í umleið 20 ymsum støðum í allari kommununi og fyri at fáa útgreinað ítøkiligari hvussu fíggjartørvurin fyri hesi arbeiði fer at verða, er ætlanin at fara undir miðvísa projektering av kloakkarbeiðunum í nøkrum av hesum støðum. Eftirfylgjandi verður farið undir tilgongd at fáa fígging til at fremja nevndu kloakkarbeiði.

Samlaða upphæddin fyri markaðum íløgum fyri kloakkir í 2013 er 5,7 mió. kr. og ynskir umsitingin við hesum at fáa loyvi at bjóða serstøk økið út til ráðgevandi virki at gera skitsuprosjekt og kostnaðarmeting av ávísum økjum, sum umsitingin vísir á.
Talan er um niðanfyri standandi øki:

1. **<u>Kloakkir í Kollafirði</u>**
   Fyri at lúka krøvini frá Umhvørvisstovuni, er ætlanin at gera arbeiðið liðugt at savna allar kloakkir í Kollafirði, Kollfjarðardali og Hundsarabotni í skipaðar leiðingar og út á sjógv. Miðað verður eftir at savna so nógvar útleiðingar saman sum møguligt, áðrenn tær verða

leiddar út á sjógv minst 1 m undir størstu fjøru. Partur av arbeiðinum at skipa kloakkirnar er longu gjørdur, talan er um Norðuri í Sundinum í Líðini og á Oyrareingjum.

2. **Kloakkir í Kaldbak og Kaldbaksbotni**
   Ætlanin er at samla allar kloakkir í Kaldbak í skipaðar leiðingar og út á sjógv. Hetta fyri at lúka krøvini frá Umhvørvisstovuni.

   Partur av arbeiðinum at skipa kloakkirnar er longu gjørt, við Á er útleiðing lóglig. Inn á Gørðum og inni á Fløtum er kloakkin leidd í skipaðar leiðingar.

3. **Kloakkir við Bakkagøtu og á Argjaboða á Argjum**
   Ætlanin er framhaldandi at samla kloakkirnar á Argjum í skipaða leiðing og út á sjógv fyri at lúka krøvini frá Umhvørvisstovuni. Talan er um kloakkútleiðingar við Bakkagøtu og Argjaboða

   Partur av arbeiðinum at fylgja krøvinum fá Umhvørvisstovuni er longu gjørt, við Sjósavnið, við Bátahylin og frá kloakkini frá Kongavarða/Hamrinum.

4. **Kloakkir í Syðradali og Norðadali**
   Henda ætlanin er at samla kloakkirnar ávikavist í Syðradali og Norðadali í skipaða leiðing fyri at lúka krøvunum frá Umhvørvisstovuni.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at játta:
1) kr. 300.000,- til projektering av kloakkum í Kollafirði
2) kr. 150.000,- til porjektering av kloakkum í Kaldbak og Kaldbaksbotni
3) kr. 150.000,- til projektering av kloakkum við Bakkagøtu og á Argjabooða á Argjum
4) kr. 100.000,- til projektering av kloakkum í Syðradali og Norðadali
ella samanlagt kr. 700.000,- til tey 4 omanfyri standandi arbeiði av markaðum íløgum fyri kloakkir fyri 2013, konto 6875 og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 27. februar 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevndin 13. mars 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 21. mars 2013:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Limirnir í staðbundnu nevndini spyrja hvør arbeiðsætlan fyriliggur fyri Kaldbak. Hvussu nógv av teimum 150.000 kr eru brúktar.

**Kaldbaksnevndin 18. september 2013:**Umsitingin kunnaði um at projekteringsarbeiðið er í gongd við atliti til at gera arbeiðið í næsta ár.

**-Ískoyti:**
Tórshavnar kommuna skal innan 2015 gera ávís kloakkarbeiði, so at kloakkirnar lúka minstukrøvini, ið eru ásett í spillivatnsætlanini sambært kungerð nr. 111 frá 7. september 2009, sum býráðið 1. november 2012 hevur samtykt (sí mál nr. 2010-2190).

**Fíggjarlig viðurskifti.**

Biðið verður um kr. 400.000 til projektering av framfluttum íløgum fyri kloakkarbeiði í 2012, kt. 6875.

5. **Kloakkir á Hvítanesi**
   Ætlanin er at samla allar kloakkir á Hvítanesi í skipaðar leiðingar og út á sjógv. Hetta fyri at lúka krøvini frá Umhvørvisstovuni.

   Størsti parturin at skipa leiðingarnar á Hvítanesi er longu gjørt og er ætlanin at beina hesar leiðingar í góðkenda leiðing sunnan fyri Hvítanes.

6. **Kloakkir í Kirkjubø og á Velbastað**
   Ætlanin er at samla allar kloakkir ávíkavist í Kirkjubø og á Velbastað í skipaðar leiðingar og út á sjógv. Hetta fyri at lúka krøvini frá Umhvørvisstovuni.

Partur av arbeiðinum at skipa kloakkirnar er longu gjørt og fevnir arbeiðið um at skipa so fyri at útleiðingarnar lúka krøvini frá Umhvørvisstovuni við at leiðingarnar koma minst 1 m. undir størstu fjørðu.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta:
5) kr. 150.000,- til projektering av kloakkum á Hvítanesi
6) kr. 250.000,- til projektering av kloakkum í Kirkjubø og Velbastað
ella samanlagt kr. 400.000,- til tey 2 omanfyri standandi arbeiði av framfluttum íløgum fyri kloakkir fyri 2012 konto 6875 og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 28. november 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 28. november 2013:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðið 28. november 2013:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Prosjektuppskot fyri Kirkjubø og Velbastað at savna allar kloakkir í skipaða leiðing út á streymasjógv er liðugt. Á Velbastað er ætlanin at savna tær núverandi 4 útleiðingar á sjógv í eina skipaða leiðing, sum verður veitt út á streymasjógv, so útleiðingin líkur krøvini frá Umhvørvisstovuni. Sí j.nr 15/03558.

Í Kirkjubø er ætlanin at savna allar kloakkirnar í verandi útleiðing á Sjógv. j.nr. 15/03200.

Ætlanin er, at fáa PB Consult gera prosjekt klárt til útbjóðing og bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión og leggja fyri nevnd aftur.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Biðið verður um kr. 200.000,- av íløgum fyri kloakkarbeiði í 2016, kt. 6875 til gerð av útbjóðingartilfari.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 200.000,- av íløgum fyri kloakkir fyri 2016 konto 6875 til at bjóða arbeiðið út í innbodna lisitatión og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 13. januar 2016:** Nevndin staðfestir, at játtaður peningur sambært samtykt 28. november 2013 er nýttur til støðulýsing/heildarætlan fyri økini á Hvítanesi, Kirkjubø og Velbastað og ikki til projektering.
Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. januar 2016:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 28. januar 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Prosjekt fyri Kirkjubø og Velbastað, at savna allar kloakkir í skipaða leiðing og leggja út á streymasjógv er liðugt og boðið út í innbodnari lisitatión j.nr 15/03558-9. Lisitatiónin varð hildin á skrivstovuni hjá PB-Consult 31. mars 2016, kl. 10.00. Inn komu 4 boð. Av teimum hevði Sp/f Maskingrevstur lægsta boð. Umsitingin hevur latið gera lisitatiónsprotokol saman við ráðgeva j.nr. 15/03558-15

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Sambært fíggjarligu uppgerð j.nr. 15/03558-16 verður samlaði fíggjartørvurin fyri prosjekti kr. 2,3 mió. (v/6,25%MVG).
Samlaða upphæddin fyri markaðu íløgum 2016 er kr. 5,8 mió. á Konto 6875.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at játta kr. 2,3 mió. av íløgum fyri kloakkir 2016 konto 6875 og beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 06. apríl 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Helena D. á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 13. april 2016:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. apríl 2016:** Einmælt samtykt.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>19. apríl 2016 | Blað nr.: 13027<br>Formansins merki: |

## 119/16 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2016

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 09.03.2016 | 115/16 | 16/00040-1 |
| 2 Býráðsfundur | 17.03.2016 | 70/16 | 16/00040-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 13.04.2016 | 151/16 | 16/00040-1 |
| 4 Býráðsfundur | 19.04.2016 | 119/16 | 16/00040-1 |
| 5 Býráðsfundur | | | 16/00040-1 |

**Málslýsing:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. § 10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 09. marts 2016:** Framlagt og góðkent.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 17. mars 2016:** Framlagt og góðkent.

Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 13. april 2016:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 19. apríl 2016:** Framlagt og góðkent.

# 120/16 Ársroknskapur fyri 2015 hjá Tórshavnar kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 13.04.2016 | 150/16 | 16/01103-1 |
| 2 Býráðsfundur | 19.04.2016 | 120/16 | 16/01103-1 |

**Málslýsing:**
Sambært kommunustýrislógini hevur fíggjarnevndin ábyrgd av at leggja grannskoðaðan roknskap, saman við grannskoðanarfrágreiðingini, fyri kommunustýrið til góðkenningar og undirskrivingar.

**Tilmæli:**

**Fíggjarnevndin 13. april 2016:** Samtykt at góðkenna roknskapin fyri 2015 og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. apríl 2016:** Einmælt samtykt at góðkenna roknskapin fyri 2015.

# 121/16 Ársroknskapur Tórshavnar havn 2015

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 07.03.2016 | 10/16 | 16/01133-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 13.04.2016 | 149/16 | 16/01133-1 |
| 3 Býráðsfundur | 19.04.2016 | 121/16 | 16/01133-1 |

**Vinnunevndin 07. mars 2016:** Samtykt at taka undir við uppskotinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. april 2016:** Samtykt at góðkenna roknskapin fyri Tórshavnar havn 2015 og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. apríl 2016:** Einmælt samtykt at góðkenna roknskapin fyri Tórshavnar havn 2015.

| | Býráðsfundur<br>19. apríl 2016 | Blað nr.: 13030<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

## 122/16 Framflytingar roknskaparárið 2015

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 13.04.2016 | 148/16 | 16/01591-1 |
| 2 Býráðsfundur | 19.04.2016 | 122/16 | 16/01591-1 |

**Málslýsing:**
Mannagongdin hjá Tórshavnar kommunu er, at ikki nýttar játtanir verða fluttar til komandi ár. Hesar skulu játtast í býráðnum sum eyka játtan. T.v.s. við tveimum viðgerðum.

Í sambandi við at roknskapurin fyri 2015 er gjørdur upp, er gjørt eitt yvirlit yvir rakstrar- og íløgujáttanir at flyta til 2016. Samlaða framflytingin fyri rakstur er eitt netto undirskot á 4,7 mió. kr. Ikki nýttar íløgujáttanir at flyta fram eru 154,8 mió. kr. Bókaðar skattainntøkur og aðrar inntøkur í 2015 vóru 72,8 mió. kr. hægri enn mett í fíggjarætlanini.
Yvirlitið saman við ynsktum broytingum verður lagt fram saman við roknskapinum fyri 2015.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, Fyrisitingarstjórin og fíggjarleiðarin mæla til at játta framflyting á t.kr. -4,7 mió. kr. netto, til rakstur og 154,8 mió.kr. til íløgur. Eisini verður mælt til, at taka undir við niðanfyristandandi broytingum:

Framflyting
Uppskot til broyting

| Flytast av: | | | Flytast á: | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Navn | upphæd | Deild | Navn | upphædd |
| 2612 | Barnavernd | 350.000 | 2613 | Børn sett heiman í fosturfamilju | 350.000 |
| 2617 | Brúkaragjald, serstovnar | 600.000 | 2613 | Børn sett heiman í fosturfamilju | 600.000 |
| | | | | | |
| 3110 | Reiðrið | 1.081.000 | 3199 | Regulering barnatal | 1.081.000 |
| 3213 | Systkinaavsláttur | 2.000.000 | 3199 | Regulering barnatal | 2.000.000 |
| | | | | | |
| 4124 | Frískúlin í Havn | 70.000 | 4140 | Ætlanir á skúlaøkinum | 70.000 |
| 4142 | Aðrar útreiðslur skúlar | 40.000 | 4140 | Ætlanir á skúlaøkinum | 40.000 |
| 4144 | Skúlabarnaflutningur | 90.000 | 4140 | Ætlanir á skúlaøkinum | 90.000 |
| | | | | | |

Mælt verður til at hægri skattainntøkurnar verða brúktar til fígging sambært niðanfyristandandi talvu:

| | | |
|---|---|---|
| **Meirinntøkur 2015** | | **72.767** |
| t.kr. 1000 | | |
| 1110 | Býráðið | -113 |
| 1210 | Val og valnevndir | -322 |
| 1460 | Kommunufeløg | -281 |
| 2720 | Heilsuhúsið | -1.180 |
| 2721 | Røktartænastur | -7.898 |
| 2722 | Tilboð | -2.492 |
| 5510 | Tórshavnar Býarsavn | -633 |
| 7210 | Brandstøðin | -1.522 |
| **Meirnýtsla á ymiskum rakstrarstøðum** | | **-14.441** |
| Samtykt | Ymiskt asfalt arbeiði | -2.000 |
| Samtykt Heilsuhúsið | Húsaumsitingin | -1.200 |
| **Samtykt meirinntøkur** | | **-3.200** |
| **Avdráttir 2015** | **Afturgjald av skuld** | **-16.671** |
| **Annað** | | **38.455** |

| **Býráðsfundur**<br>19. apríl 2016 | Blað nr.: 13032 |
|---|---|
| | Formansins merki: |

**Fíggjarnevndin 13. april 2016:** Ein samd nevnd tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Sjúrður Olsen og Annfinn Brekkstein, mælir harumframt býráðnum til at taka undir við niðanfyristandandi jattan, sum ein minniluti, Jógvan Arge, tekur støðu til á einum seinni fundi:

| | | |
|---|---|---|
| 6210 | Fríðkan og viðlíkahald | - 7.000 |
| | Eldrarøkt | - 8.000 |
| **Rakstur** | | **- 15.000** |
| | | |
| 5375 | Mullers Pakkhús | - 2.000 |
| 5775 | Ítróttaranlegg - Tórsvøllur | - 5.000 |
| 5775 | Ítróttaranlegg - Svimjihøllin | - 1.500 |
| 5775 | Ítróttaranlegg -Fótbóltsvøllur í Hoyvík | - 1.000 |
| | Kommunuskúlin | - 12.155 |
| | Bankabygningur Niels Finsensgøta | - 1.800 |
| **Løgur** | | **- 23.455** |
| | | |
| **Tilsamans** | | **- 38.455** |

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>19. apríl 2016 | Blað nr.: 13033 |
| | Formansins merki: |

**Býráðsfundur 19. apríl 2016:** Fyrst varð atkvøtt um tilmæli frá Marin Katrina Frýdal, ið tekur undir við tilmælinum og mælir til, at fluttar verða av koto 5775 Ítróttaranlegg Tórsvøllur 5 mió. og Fótbóltsvøllur í Hoyvík 1. mió, tils. 6 mió. kr., ið verða fluttar til eldraøki, ið fall við 2 atkvøðum fyri og 10 ímóti.

Fyri atkvøddu: Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrun Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen.

Greiddi ikki atkvøðu: Jógvan Arge

Síðan varð atkvøtt um tilmæli frá Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrun Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreassen og Sjúrður Olsen ið taka undir við framflytingunum við tí viðmerking, at greitt ábyrgdarbýti er millum FSF og Tórshavnar kommunu og hvør partur kommununar verður í verkætlanini skal vera greitt ásett, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og ongari ímóti

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrun Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen.

Greiddu ikki atkvøðu: Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

Jógvan Arge hevur ta viðmerking, at hann tekur undir við tilmælinum frá kommunustjóranum, fyrisitingarstjóranum og fíggjarleiðaranum men hann tekur ikki undir við at játtað verður til Tórsvøll áðrenn ábyrgdarbýtið millum FSF og Tórshavnar kommunu er ásett.

## 123/16 Grøn ætlan fyri Tórshavnar Kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 01.04.2016 | 103/16 | 16/00721-3 |
| 2 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 06.04.2016 | 30/16 | 16/00721-3 |
| 3 Býráðsfundur | 19.04.2016 | 123/16 | 16/00721-3 |

**Málslýsing:**
Vísandi til ein átrokandi tørv á serætlanum fyri at ráðleggja og gera framtíðar skipanarætlanir eftir, hevur býarskipanardeildin eftir ynski frá teknisku leiðsluni, stjóra og býararkitekti, latið gera eitt uppskot til eina grøna ætlan fyri kommununa. Grøna ætlanin er ætlað at vera eitt arbeiðsamboð til at gera lendisætlanir eftir, ið lýsa og greina landslag, náttúru og verndartiltøk av grønu økjunum í kommununi.

Fyrsti partur í ætlanini lýsir mál, mið og tær endamálslýsingar, sum liggja til grund fyri, at borgarin fær væl virkandi grøn øki í kommununi.

Annar partur er ein fyribils skrá yvir ítøkiligar verkætlanir, sum kommunan hevur í hyggju at seta í verk komandi árini. Hetta snýr seg bæði um ítøkiligar verkætlanir og um neyvar ætlanir fyri ávís grøn øki í kommununi.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at samtykkja uppskotið, ið raðfestir grønu økini í Tórshavnar kommunu, og at beina málið í býráðið til kunningar umvegis náttúru- og umhvørvisnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 01. apríl 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 06. apríl 2016:** Kunnað varð um málið.

**Býráðsfundur 19. apríl 2016:** Kunnað varð um málið.

# 124/16 Gul ætlan fyri Tórshavnar kommunu (ljósætlan)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 01.04.2016 | 102/16 | 15/04801-1 |
| 2 Tekniska nevnd | 06.04.2016 | 47/16 | 15/04801-1 |
| 3 Býráðsfundur | 19.04.2016 | 124/16 | 15/04801-1 |

**Málslýsing:**
Býarskipanardeildin hevur arbeitt við eini ljósætlan, nevnd *gul ætlan*, ið gevur ítøkiligar ávísingar til ljósið í Tórshavnar kommunu. Grundarlagið er sprotið úr einari norðurlendskari fatan av ljósi og estetikki saman við eini klárari hugsan um orku- og rakstrardygd.

Ætlanin er eitt ítøkiligt arbeiðsamboð, men somuleiðis eitt strategiskt átak, ið tryggjar eina heildarætlan fyri ljósið í kommununi. Grundað á politiskar avgerðir og ynskir, verður ein partur av útbúnaðinum, sum hevur verið standard í almennu ljóssetingini, dagførdur við munadyggari tøkni. Nýggj tøkni stendur á gáttini, og innleiðslan av LED ljóskeldum í almennu ljóssetingini er byrjað. Hendan nútíðargerð av tøknini hevur somuleiðis eitt betri umskifti við sær innan rakstur og viðlíkahald.

Krøvini til ljósið í dag eru ikki bert til ta tøkniligu góðskuna. Ljósið fevnir um týdningarmiklar karmar og viðurskifti, ið skapa virðir í býarumhvørvinum, har lívið og tørvurin hjá menniskjanum er í miðdeplinum.

Gula ætlanin fevnir um tvey hefti. Fyrra heftið inniheldur eina lýsing av visjónum og endamálum, einum grundarlagi og leiðreglum fyri gott ljós, eins og eina skráseting av verandi útbúnaði.
Seinna heftið fevnir um økisgreiningina av ymsu økjunum í Tórshavn, sum er grundarlagið undir virkisætlanini og teimum átøkum, ið fremjast skulu. Manualurin, ið er framhald av økisgreiningini, vísir á, hvør útbúnaður skal nýtast á vegunum, í bústaðar- og vinnuøkjunum, í miðbýnum, eins og í úrvaldum økjum.

Endamálið við ætlanini er, at kommunalu ljósini skulu planleggjast, prosjekterast og endurnýggjast eftir eini tilgongd, har funksjón, estetikkur og umhvørvi verða raðfest.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at samtykkja uppskotið, ið staðfestir, hvør ljósútbúnaður skal nýtast í Tórshavnar kommunu og at beina málið í býráðið til kunningar umvegis teknisku nevnd.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 01. apríl 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 06. apríl 2016:** Framlagt.

**Býráðsfundur 19. apríl 2016:** Framlagt.

**FUNDURIN LOKIN KL. 22:00**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Heðin Mortensen | Jógvan Arge | Helena Dam á Neystabø |
| Tróndur Sigurðsson | Halla Samuelsen | Bogi Andreasen |
| Annfinn Brekkstein | Jákup Dam | Marin Katrina Frýdal |
| Bjørghild Djurhuus | Elin Lindenskov | Sjúrður Olsen |
| | Sigrun Mohr | |